Trúarjáttan
føroysku
fólkakirkjunnar

Trúarjáttan føroysku fólkakirkjunnar

Hans Jacob Joensen týddi

FØROYSKT KIRKJUMÁL

Trúarjáttan føroysku fólkakirkjunnar
© 2000, Hans Jacob Joensen og Føroyskt Kirkjumál
Umbróting, prent og innbinding: Føroyaprent
Útgevari: Føroyskt Kirkjumál
2. útgáva 2012

ISBN 978-99918-821-5-4

Innihald

Formæli 7

TÆR TRÍGGJAR VANLIGU ELLA SAMKIRKJULIGU TRÚARJÁTTANIRNAR 9
Fyrsta trúarjáttan (Symbolum apostolicum) 10
Onnur trúarjáttan (Symbolum Nicaenum) 10
Triðja trúarjáttan (Symbolum Athanasii – contra Arianos scriptum) 11

AUGSBURGSKA TRÚARJÁTTANIN 15
Formæli 16
Fyrri partur
Høvuðstrúargreinarnar 19
1. grein: Um Gud 19
2. grein: Um arvasyndina 19
3. grein: Um Guds son 20
4. grein: Um rættvísgeringina 20
5. grein: Um kirkjuliga embætið 20
6. grein: Um hitt nýggja lýdnið 21
7. grein: Um kirkjuna 21
8. grein: Hvør er kirkjan? 22
9. grein: Um dópin 22
10. grein: Um kvøldmáltíð Harrans 22
11. grein: Um skriftamálið 22
12. grein: Um bótina 22
13. grein: Um at brúka sakramentini 23
14. grein: Um kirkjuligu skipanina 23
15. grein: Um kirkjusiðirnar 23
16. grein: Um samfelagsviðurskiftini 24
17. grein: Um Krists afturkomu til dóms 24
18. grein: Um hin fría viljan 25
19. grein: Um atvold syndarinnar 25

20. grein: Um trúnna og góðar gerningar 26
21. grein: Um halgimennadýrkan 29

Seinni partur
Greinir, har tey misbrúk verða viðgjørd, ið broytt eru 31
22. grein: Um báðar lutirnar í sakramentinum 31
23. grein: Um hjúnalag prestanna 32
24. grein: Um messuna 34
25. grein: Um skriftamálið 37
26. grein: Um mun á mati 38
27. grein: Um klosturlyftini 42
28. grein: Um kirkjuliga valdið 47

Eftirmæli 56

DR. MARTIN LUTHERS LÍTLA KATEKISMUS . 59
Fortala 60
Fyrsti høvuðspartur 65
Hini tíggju boðini 65
Annar høvuðspartur 68
Trúgvin 68
Triði høvuðspartur 70
Faðir vár 70
Fjórði høvuðspartur 73
Hins heilaga dóps sakramenti 73
Hvussu vanlig fólk eiga at verða lærd at skrifta 74
Sig mær í stuttum, hvussu eg skal skrifta 75
Fimti høvuðspartur 77
Altarsins sakramenti 77
Hvussu ein húsbóndi eigur at læra heimafólk sítt at biðja morgun- og aftanbøn 78
Hvussu ein húsbóndi eigur at læra heimafólk sítt at biðja undan og aftan á máltíðina 79
Hústalvan 80

Formæli

Tað munnu óivað vera fleiri, sum hava saknað, at tær skriftir, ið eru bindandi fyri trúgv og læru fólkakirkjunnar, ikki allar hava verið á føroyskum máli. Nú er longu langt síðan, vit fingu ritualbók, altarbók, sálmabók og Halgubók á føroyskum máli, og tí má tíðin haldast vera komin og ríkiliga tað, tá eisini hesar skriftir finnast á føroyskum og savnaðar í somu bók.

Eg fari at nýta høvið at takka Regini Dahl skaldi fyri loyvi at nýta týðingina hjá faðir hansara, Jákupi Dahl prósti av Ápostólsku trúarjáttanini og Lítlu Katekismus Luthers. Eg fari eisini at takka lærarunum Hans Jacob Sigvardsen, Svenning Tausen og Theodor Hansen fyri góð málslig ráð.

Skriftstøðini verða ikki altíð endurgivin í samsvari við autoriseraðu týðingina.

Henda bók verður latin Føroya fólki við ynski um, at hon verður til gagns og signingar.

Tórshavn á grækarismessu 2000

Hans Jacob Joensen

2. útgáva

„Trúarjáttan føroysku fólkakirkjunnar“ hevur verið útseld, og hava fólk spurt eftir bókini. Bókin verður nú givin út av nýggjum við ávísum rættingum.

Tórshavn á ólavsøku 2012

Hans Jacob Joensen

TÆR TRÍGGJAR VANLIGU ELLA SAMKIRKJULIGU TRÚARJÁTTANIRNAR

Fyrsta trúarjáttan

(Symbolum apostolicum)

Eg trúgvi á Guð faðir, hin alvalda, skapara himins og jarðar.

Og á Jesus Krist, Guðs einborna son, váran harra, sum er gitin av heilagum anda, borin í heim av Mariu moy, pínslaður undir Pontiusi Pilatusi, krossfestur, deyður og jarðaður, niður farin til heljar, triðja dagin staðin upp frá deyðum, farin til himmals, sitandi við høgru hond Guðs faðirs, hins alvalda, haðani hann kemur at døma livandi og deyð.

Og á heilagan anda, eina heilaga almenna kirkju, samfelag teirra heilagu, fyrigeving syndanna, uppreisn likamsins og lív um aldur og ævir. Amen.

Onnur trúarjáttan

(Symbolum Nicaenum)

Eg trúgvi á ein Gud, hin alvalda Faðir, sum hevur skapað himmal og jørð, allar sjónligar og ósjónligar lutir.

Og á ein Harra, Jesus Krist, Guds einborna Son, sum er føddur av Faðirinum fyri upphav tíðarinnar, Gud av Gudi, ljós av ljósi, sannur Gud av sonnum Gudi, føddur, ikki skapaður, av somu veru sum Faðirin, ið alt hevur skapað, sum fyri okkum menniskju og frelsu okkara er komin niður av himni og er vorðin hold við Heilagum Anda av Mariu moy og gjørdist menniskja, sum eisini okkara vegna er krossfestur undir Pontiusi Pilatusi, píndur og jarðaður. Triðja dagin risin upp samsvarandi Skriftunum og farin til himmals, situr við Faðirsins høgru hond og skal koma aftur í dýrd at døma livandi og deyð, og á ríki hansara skal eingin endi vera.

Og á Heilagan Anda, Harran og lívgevaran, sum gongur út frá Faðirinum og Soninum, sum saman við Faðir og Soni verður tilbiðin og dýrmettur, og sum hevur talað við profetunum. Og á eina heilaga, almenna og ápostólska kirkju.

Eg játti ein dóp til fyrigevingar syndanna og vænti uppreisn teirra deyðu og lívið í komandi heimi. Amen.

Triðja trúarjáttan

(Symbolum Athanasii – contra Arianos scriptum)

1. Hvør tann, sum vil verða frelstur, má fram um alt hava ta almennu trúnna.
2. Hvør tann, sum ikki varðveitir hana reina og rætta, verður uttan iva ævinliga glataður.
3. Hetta er almenna trúgvin, at vit æra ein Gud í tríeindini og tríeindina í einum
4. og hvørki blanda saman persónarnar ella býta sundur guddómin.
5. Tí at ein er persónur Faðirsins, ein annar Sonarins, aftur ein annar Heilaga Andans.
6. Men Faðirsins og Sonarins og Heilaga Andans guddómur er ein, dýrd teirra líka stór, og hátign teirra líka ævig.
7. So sum Faðirin er, soleiðis er Sonurin, soleiðis er eisini Heilagi Andin.
8 Faðirin er óskapaður, Sonurin er óskapaður, Heilagi Andin er óskapaður.
9. Faðirin er ómetaligur, Sonurin er ómetaligur, Heilagi Andin er ómetaligur.
10. Faðirin er ævigur, Sonurin er ævigur, Heilagi Andin er ævigur.
11. Og tó eru ikki tríggir ævigir, men ein ævigur,

12. eins og tað ikki eru tríggir óskapaðir, heldur ikki tríggir ómetaligir, men ein óskapaður og ein ómetaligur.
13. Á sama hátt er Faðirin alvaldur, Sonurin alvaldur, Heilagi Andin alvaldur,
14. og tó eru ikki tríggir alvaldir, men ein alvaldur.
15. Soleiðis er Faðirin Gud, Sonurin Gud, Heilagi Andin Gud,
16. og tó eru ikki tríggir gudar, men ein Gud.
17. Soleiðis er Faðirin Harri, Sonurin Harri, Heilagi Andin Harri,
18. og tó eru ikki tríggir harrar, men ein Harri.
19. Tí sum hin kristni sannleikin noyðir okkum at játta hvønn persón sær sum Gud og Harra, somuleiðis noktar almenna trúgvin okkum at nevna tríggjar gudar ella tríggjar harrar.
20. Faðirin er ikki gjørdur av nøkrum, heldur ikki skapaður, heldur ikki borin.
21. Sonurin er av Faðirinum eina, ikki gjørdur, ikki skapaður, men borin.
22. Heilagi Andin er av Faðirinum og Soninum, ikki gjørdur, heldur ikki skapaður, heldur ikki borin, men gingin út frá teimum.
23. Tí er ein Faðir, ikki tríggir fedrar, ein Sonur, ikki tríggir synir, ein Heilagur Andi, ikki tríggir heilagir andar.
24. Og í hesi tríeindini er einki fyrr ella seinni, einki størri ella minni,
25. men allir tríggir persónarnir eru sínámillum líka ævigir og javnlíkir, so at, sum áður sagt, tríeindin í øllum má verða ærað í eindini, og eindin í tríeindini.
26. Tann, sum tí vil verða frelstur, má hugsa soleiðis um tríeindina.
27. Men til æviga sælu er eisini neyðugt, at ein fult og fast trýr, at vár Harra Jesus Kristus gjørdist menniskja.
28. Hetta er tí tann rætta trúgvin, at vit trúgva og játta, at

vár Harra Jesus Kristus, Sonur Guds, er bæði Gud og somuleiðis menniskja.

29. Hann er Gud, føddur av veru Faðirsins fyri allar øldir, og menniskja, føddur í tíðini av veru móður sínar,
30. fullkomin Gud, fullkomin menniskja, við skynsamari sál og menniskjuligum holdi.
31. Faðirinum líkur í guddómi, sum menniskja minni enn Faðirin.
32. Men hóast hann er Gud og menniskja, er hann tó ikki tveir, men ein Kristus,
33. ein, ikki við umbroyting av gudsnatúrini til hold, men við tað at Gud tók á seg mannanatúr,
34. ein í síni heild, ikki við samanblandingi natúranna, men við persónseinleika.
35. Tí sum hin skynsama sálin og holdið eru ein menniskja, soleiðis eru Gud og menniskja ein Kristus,
36. sum leið fyri frelsu vára, fór niður til heljar, reis upp frá deyðum triðja dagin,
37. fór upp til himmals, situr við høgru hond Guds Faðirs, hins alvalda, haðani hann skal koma at døma livandi og deyð.
38. Tá ið hann kemur aftur, skulu øll menniskju rísa upp likamliga og leggja fram roknskap fyri gerningar sínar.
39. Og tey, ið hava gjørt gott, skulu ganga inn til ævigt lív; men tey, ið hava gjørt ilt, til æviga eldin.
40. Hetta er almenna trúgvin. Tann, ið ikki fult og fast trýr henni, kann ikki verða frelstur.

AUGSBURGSKA TRÚARJÁTTANIN

Formæli

Sigursæli drottin, Caesar Augustus, mildasti harri!

Tygara keisaraliga hátign hevur boðað til ríkisdag í Augsburg til tess at samráðast um hjálparhermenn móti turkinum, kristinnavnsins og kristindómsins gamla og herviligasta arvafígginda, hvussu tað við varandi og áhaldandi herútbúgving kann veitast mótstøða móti øði og atsókn hansara; tínæst viðvíkjandi ósemjuni um heilaga átrúnað okkara og kristintrúgv, fyri at áskoðanir og sjónarmið partanna millum í hesi søk kunnu verða hoyrd, kend og umhugsað í kærleika, mildi og spaklyndi, til tess at semja kann fáast um hesar spurningar, og tað kann verða rættað, sum báðir partar hava misskilt í Skriftunum, og alt kann verða lagt undir hin eina, samfelda sannleikan, og kristilig semja fingin í lag, so at vit í framtíðini kunnu dýrka og varðveita ein reinan og sannan átrúnað, og í sátt og semju liva í teirri einu kristnu kirkjuni, eins og vit liva og stríðast undir einum Kristi. Vit, ið hava skrivað undir, eru eins og aðrir kurfúrstar, fúrstar og stættir stevndir til áðurnevnda ríkisdag og eru tí komnir til Augsburg í góðari tíð, lýdnir keisarans boðum, og uttan at reypa loyva vit okkum at nevna, at vit vóru millum teir fyrstu.

Tá ið nú tygara keisaraliga hátign fyrst, ið ríkisdagurin var settur, eisini her í Augsburg legði uppskot fyri kurfúrstarnar, fúrstarnar og hinar ríkisstættirnar um millum annað, at teir einstøku stættirnir eftir keisarans boðum skuldu leggja fram sína áskoðan og siga sína hugsan á týskum og latínskum máli, og tá ið vit eftir samráðingarnar seinasta mikudag hava svarað tygara keisaraligu hátign, at vit okkara vegna vildu leggja fram greinirnar í trúarjáttan okkara nú fríggjadagin, tá leggja vit lýdnir tygara keisaraligu hátign fram trúarjáttan okkara og prædikumanna okkara í hesi søk, so sum teir higartil hava boðað læruna samsvarandi Skriftini og Guds reina orði.

Um nú eisini hinir kurfúrstarnir, fúrstarnir og ríkisstættirnir á sama hátt leggja fram sínar hugsanir um hesa søk í skriftum á týskum og latíni, soleiðis sum tygara keisaraliga hátign áður hevur skotið upp, tá vátta vit sambært tí lýdni, vit skylda tygara keisaraligu hátign sum okkara mildasta harra, at vit eru til reiðar at samráðast vinaliga við stættirnar og áðurnevndu fúrstar, vinir okkara, um nýtiligar og hóskandi útvegir, fyri at vit heiðurliga kunnu semjast, og ósemjan við Guds hjálp kann verða burturbeind, og vit aftur kunnu savnast um ein sannan og samdan átrúnað, eftir at báðir partar hava lagt fram sínar skriftir, og samráðst er um málið á henda hátt, friðarliga, uttan hatskt stríð partanna millum; soleiðis sum vit øll eiga at liva og stríðast undir einum Kristi og játta ein Krist, og má tá eisini alt eftir boði tygara keisaraligu hátignar á henda hátt verða leitt til Guds sannleika. At Gud í hesi søk má veita hjálp og frið, tað biðja vit so bønliga um.

Men spyrst einki burturúr, tá ið tað snýr seg um hin partin, hinar kurfúrstarnar, fúrstarnar og stættirnar, so sum ætlanin er við boði tygara keisaraligu hátignar, og bera hesar samráðingar ongan ávøkst, so gera vit tó greitt, at vit ikki vilja draga okkum undan nøkrum, ið á nakran hátt kann skapa kristiliga semju, sum kann fáast í lag fyri Gudi og við góðari samvitsku. Hetta fara bæði tygara keisaraliga hátign og hinir kurfúrstarnir og ríkisstættirnir og allir, sum við ídni og kærleika stunda á hin reina átrúnaðin og sinniliga vilja lýða á hesa søk, mildliga við sóma at viðurkenna og skilja av trúarjáttan og prædiku okkara.

Ikki bara eina ferð, men fleiri ferðir hevur tygara keisaraliga hátign mildliga gjørt kurfúrstum, fúrstum og stættum kunnugt, at tygara keisaraliga hátign av ávísum grundum, sum tá vórðu nevndar, tekur ikki avgerð í hesi søk. Á ríkisdegnum í Speyer, sum hildin varð í 1526, lótu tygum hetta lesa upp og kunngjørdu alment sambært fyriskipaða málburðinum í keisaraligu fyriskipan tygara, at tygum hjá pávanum fara at virka fyri at fáa kallað saman ein kirkjufund. Hesum varð meir greitt frá í fjør á seinasta ríkisdegi í Speyer, har tygara keisaraliga hátign

við harra Ferdinandi, kongi av Bøhmen og Ungarn, vini og milda harra okkara, og eftir fyriskipanini við talsmanni og keisaraligum umboðsmonnum millum annað læt hetta bera fram, at tygara keisaraliga hátign hevði umhugsað álitið at kalla saman til almennan kirkjufund. Álitið høvdu teir skrivað, sum komnir vóru saman í Regensburg, ríkislandshøvdingi tygara keisaraligu hátignar, forsetin, ríkisráðslimirnir og sendiboðini frá hinum stættunum. Tygara keisaraliga hátign helt eisini, at tað var gagnligt at kalla saman til ein kirkjufund, og tygara keisaraliga hátign ivaðist ikki í, at pávin kundi fáast til at halda ein almennan kirkjufund, av tí at tey mál, sum samráðingar tá vóru um millum tygara keisaraligu hátign og pávan, vóru um at enda í sátt og kristiligari semju. Tí boðaðu tygara keisaraliga hátign frá, at tygum mildliga vildu virka fyri at fáa pávan at kalla saman til slíkan kirkjufund, sum, fyrst til bar, skuldi verða kunngjørdur við sendibrøvum.

Skuldi nú tað gjørst úrslitið, at eingin friðarsemja fæst okkara millum um hesar spurningar, tá lova vit hervið so staðiliga í lýdni móti tygara keisaraligu hátign at møta og tala søk okkara á einum slíkum kristiligum og fríum almennum kirkjufundi, sum kurfúrstar, fúrstar og ríkisstættir eftir álvarsamar umhugsanir í semju taka avgerð um at kalla saman til á øllum teimum ríkisdøgum, sum hildnir verða, meðan tygara keisaraliga hátign situr við ræðið.

Vit hava eisini áður á hóskiligan og lógligan hátt skotið hetta stóra álvarsmál inn fyri henda kirkjufund og tygara keisaraligu hátign. Vit standa framvegis við hesa áheitan, og tað er ikki ætlan okkara at sleppa henni, hvørki undir hesum ella øðrum samráðingum, uttan so at tað við sátt og semju verður lýtt á málið samsvarandi andanum í keisaraliga skrivinum, og loysn verður funnin í kristiligari semju. Um hetta geva vit eisini her hátíðarliga og almenna váttan.

Fyrri partur
Høvuðstrúargreinirnar

1. grein: Um Gud

Kirkjulið okkara læra einmælt, at avgerðin á kirkjufundinum í Nikea um einleikan í teirri guddómligu veruni og um teir tríggjar persónarnar er sonn og eigur at verða trúð uttan nakran iva. Hon snýr seg um, at tað er ein guddómlig vera, sum bæði verður nevnd og er hin ævigi Gud, uttan likam, sum ikki kann býtast sundur, við ómetaligum mátti, vísdómi og góðsku, sum skapar og heldur uppi øllum lutum, bæði sjónligum og ósjónligum. Men tó eru tað tríggir persónar, av somu veru og líka ævigir: Faðir, Sonur og Heilagur Andi. Orðið „persónur" verður nýtt í somu merking sum hjá kirkjufedrunum. Tað sipar ikki til ein part ella ein eginleika hjá nøkrum øðrum, men tað, ið er til í sjálvum sær.

Tey fordøma allar ranglærur, ið hava tikið seg upp ímóti hesi grein; eitt nú manikearar, ið læra, at frá upphavi eru tveir gudar, ein góður og ein óndur. Á sama hátt fordøma tey valentinianar, árianar, eunomianar, muhammedsmenn og allar teirra líkar. Eisini fordøma tey samosatenar, bæði teir eldru og teir yngru, sum á rangan og ógudiligan hátt málbera seg um Orðið og Heilaga Andan, hóast teir halda uppá, at tað bara er ein persónur. Teir siga, at teir eru ikki tveir atskildir persónar, men at Orðið merkir tað talaða orðið, og andin er ein skapt rørsla í lutunum.

2. grein: Um arvasyndina

Somuleiðis læra tey, at eftir Ádams fall verða øll menniskju, ið gitin eru á natúrligan hátt, fødd við synd. Tað merkir: uttan gudsótta, uttan álit á Gud og við girnd. Henda arvaliga sjúka ella hetta arvaliga brek er av sonnum synd, sum framvegis

fordømir og veldur teimum ævigan deyða, sum ikki verða endurfødd við dópi og heilagum anda.

Tey fordøma pelagianar og aðrar, sum nokta fyri, at arvaliga brekið er synd, men halda fast við, at menniskjan kann verða rættvísgjørd fyri Gudi við sínum egna skynsama mátti. Á tann hátt minka teir um vælgerðir Krists og heiður teirra.

3. grein: Um Guds Son

Somuleiðis læra tey, at Orðið, tað er Guds Sonur, tók á seg menniskjuliga natúr í móðurlívi sælu Mariu moyar. Tí eru tvær natúrir, hin guddómliga og hin menniskjuliga, sum eru óatskiljandi sameindar í persónseinleikanum, ein Kristus, sannur Gud og satt menniskja, føddur av Mariu moy, sum av sonnum hevur liðið, er krossfestur, deyður og jarðaður fyri at gera Faðirin sáttan við okkum og vera eitt offur ikki bara fyri arvasyndina, men eisini fyri allar syndugar gerðir menniskjanna. Hann fór niður til heljar og reis av sonnum upp triðja dagin; síðani fór hann til himmals fyri at sessast við høgru hond Faðirsins og um ævir at stýra og ráða øllum skapninginum. Og tey, ið trúgva á hann, halgar hann við at senda Heilaga Andan í hjørtu teirra. Og Andin stýrir teimum og troystar tey og ger tey livandi, og hann verjir tey ímóti djevlinum og syndarinnar makt. Hesin sami Kristus skal koma sjónligur aftur at døma livandi og deyð o. s. fr. eftir Ápostólsku trúarjáttanini.

4. grein: Um rættvísgeringina

Somuleiðis læra tey, at menniskju verða ikki rættvísgjørd fyri Gudi við egnum mátti, heiðri ella gerningum; men tey verða rættvísgjørd við trúnni fyri einki, tá ið tey trúgva, at tey verða náðað og fáa syndanna fyrigeving fyri Krists skuld, sum við deyða sínum gjørdi fulnað fyri syndir okkara. Hesa trúgv kannar Gud teimum sum rættvísi. (Rómverjabrævið 3 og 4).

5. grein: Um kirkjuliga embætið

Tí er innsett eitt embæti at læra evangeliið og býta út sakra-

mentini, fyri at vit skulu koma til hesa trúgv. Tí at Heilagi Andin verður givin við orðinum og sakramentunum sum nýti, og – nær og hvar Gud vil – virkar hann trúnna í teimum, ið hoyra evangeliið: at Gud fyri Krists skuld, og ikki tí at vit høvdu tað uppiborið, rættvísger tey, ið trúgva, at tey fyri Krists skuld verða náðað. „Fyri at vit við trúnni skulu fáa fyrijáttan andans“, Gal. 3,14.

Tey fordøma endurdoyparar og onnur, ið halda, at Heilagi Andin kemur ikki til menniskju við orðinum uttanífrá, men við teirra egnu fyrireikingum og gerningum.

6. grein: Um hitt nýggja lýdnið

Somuleiðis læra tey, at henda trúgv eigur at bera góða frukt og gera góðar gerningar, ið Gud hevur fyriskipað eftir vilja sínum, og ikki fyri at vit skulu líta á, at vit við hesum gerningum verða rættvísgjørd fyri Gudi. Tí at syndanna fyrigeving og rættvísgering fáast við trúnni, sum eisini orð Krists vátta: „Tá ið tit hava gjørt alt hetta, skulu tit siga: Vit eru ónýtir tænarar,“ Luk. 17,10. Hetta sama læra eisini kirkjufedrarnir. Tí Ambrosius sigur: „Hetta hevur Gud fyriskipað, fyri at tann, ið trýr á Krist, skal vera frelstur ikki við gerningum, men við trúnni eina, við tað at hann fær syndanna fyrigeving, hóast hann ikki hevur tað uppiborið.“

7. grein: Um kirkjuna

Somuleiðis læra tey, at tað altíð fer at vera ein heilag kirkja. Men kirkjan er samfelag teirra heilagu, har evangeliið verður boðað reint, og farið verður um sakramentini á rættan hátt. Til sanna einleika kirkjunnar er tað nóg mikið at vera samd um at boða evangeliið, og hvussu farið eigur at vera um sakramentini. Tað er ikki neyðugt, at tað allar staðir eru somu mannasiðir og halgisiðir ella kirkjusiðir, ið menniskju hava fyriskipað; sum Paulus sigur: „Ein trúgv, ein dópur, ein Gud og faðir at øllum o.s.fr.“ (Ef. 4,5-6).

8. grein: Hvør er kirkjan?

Hóast kirkjan í roynd og veru er samkoma teirra heilagu og satt trúgvandi, so er tó loyvt at taka við sakramentum, ið givin verða av óndum menniskjum; tí í hesum lívi eru nógvir hyklarar og ring fólk blandað uppí. Tað er í samsvari við orð Krists: „Teir skriftlærdu og farisearnir sita á stóli Mósesar o.s.fr.“, Matt. 23,2. Sakramentini og orðið eru virksom eftir fyriskipan og boði Krists, hóast tey verða givin av óndum menniskjum.

Tey fordøma donatistar og teirra líkar, sum sýttu fyri, at loyvt var at brúka tænastu teirra óndu í kirkjuni, og hildu, at tænasta teirra var gagnleys og óvirksom.

9. grein: Um dópin

Um dópin læra tey, at hann er neyðugur til frelsu, og at Guds náði verður boðin í dópinum. Tí eiga børnini at verða doypt og fáa lut í Guds náði, eftir at tey í dópinum eru givin Gudi.

Tey fordøma endurdoypararnar, sum vraka barnadópin og standa fast við, at børn verða frelst uttan dóp.

10. grein: Um kvøldmáltíð Harrans

Um kvøldmáltíð Harrans læra tey, at likam og blóð Harrans av sonnum eru har og verða givin teimum, ið njóta kvøldmáltíð Harrans; og teimum líkar illa tey, ið læra øðrvísi.

11. grein: Um skriftamálið

Um skriftamálið læra tey, at tað eigur at vera hildið fast við einstaklingaavloysingina, hóast tað ikki er neyðugt í skriftamálinum at rokna upp øll misbrot. Tí tað er kortini ógjørligt sambært sálminum: „Hvør kennir misbrotini?“ Sl. 19,13.

12. grein: Um bótina

Um bótina læra tey, at tey, ið fallin eru eftir dópin, nær sum helst kunnu fáa fyrigeving syndanna, tá ið tey venda um, og at kirkjan eigur at geva slíkum avloysing, sum leita til bótina. Men í roynd og veru er bótin í tveimum pørtum: annar er angurin ella tann

ræðsla, ið kemur á samvitskuna, tá ið syndin er viðgingin; hin er trúgvin, ið verður gitin av evangeliinum ella avloysingini, og sum trýr, at syndirnar verða fyrigivnar fyri Krists skuld, og sum uggar samvitskuna og fríar hana frá ræðsluni. Tínæst eiga at fylgja góðir gerningar sum fruktir av bótini.

Tey fordøma endurdoypararnar, sum nokta fyri, at tey, ið einaferð eru rættvísgjørd, kunnu missa Heilaga Andan, og somuleiðis tey, ið halda uppá, at longu í hesum lívi fellur summum menniskjum ein slíkur fullkomileiki í lut, at tey als ikki kunnu synda.

Eisini verða novatianar fordømdir, sum sýttu falnum avloysing, tá ið tey eftir dópin leitaðu til skriftamálið.

Eisini tey verða vrakað, sum ikki læra, at syndanna fyrigeving fæst við trúnni, men áleggja okkum at vinna okkum náðina við fulnaðargerningum okkara.

13. grein: Um at brúka sakramentini

Um sakramentini læra tey, at tey ikki eru innsett bert fyri at verða brúkt sum frámerki millum menniskju, men heldur fyri at tey skulu vera tekin og vitnisburður um Guds vilja móti okkum, givin at vekja og festa trúnna í teimum, sum brúka tey. Sakramentini eiga tí at verða brúkt soleiðis, at trúgvin, sum trýr lyftunum, ið verða givin og sýnd við sakramentunum, fær lív.

14. grein: Um kirkjuligu skipanina

Um kirkjuligu skipanina læra tey, at eingin má læra alment í kirkjuni ella fara um sakramentini, uttan hann er kallaður á rættan hátt.

15. grein: Um kirkjusiðirnar

Um kirkjusiðirnar læra tey, at teir siðir eiga at verða varðveittir, ið kunnu varðveitast uttan synd, og sum tryggja frið og gott skil í kirkjuni, so sum ávísir halgidagar, vissar hátíðir og annað hesum líkt.

Tó verða menniskju mint á, at tey ikki skulu lata hetta níva samvitskuna, sum var ein slík dýrkan neyðug til frelsu.

Tey verða eisini mint á, at mannasiðir, fyriskipaðir at tekkjast Gudi, at vinna sær náðina og gera fulnað fyri syndina, eru ósambæriligir við evangeliið og trúarlæruna. Tí eru lyfti og siðir viðvíkjandi mati og døgum o.s.fr., fyriskipað at vinna náðina og gera fulnað fyri syndir gagnleys og ímóti evangeliinum.

16. grein: Um samfelagsviðurskiftini

Um samfelagsviðurskiftini læra tey, at lógfestar samfelagsskipanir eru Guds góðu gerningar, at loyvt er kristnum menniskjum at sita í almennum embætum, at vera dómarar, at døma í málum eftir keisaraligum og øðrum galdandi lógum, at áseta (deyða)revsingar samsvarandi rættarreglum, at kríggjast rættvísliga, at gera hertænastu, at fáast við lógligan handilsskap, at eiga ognir, at gera eið eftir boðum frá yvirvaldinum, og at giftast.

Tey fordøma endurdoypararnar, sum forbjóða kristnum menniskjum at gera hesar samfelagsligu skyldur.

Tey fordøma eisini tey, sum siga, at evangeliski fullkomileikin er ikki gudsótti og trúgv, men at svíkja samfelagsligu skyldurnar, tí evangeliið lærir eina æviga rættvísi í hjartanum. Men evangeliið upploysir ikki samfelagið ella heimini, men krevur staðiliga, at tey verða varðveitt sum Guds skipanir, og at kærleikin verður útintur í slíkum skipanum. Tí er tað neyðugt hjá kristnum menniskjum at vera yvirvaldinum og lógum tess lýðin, uttan so at tað gevur boð um at synda. Tá eiga tey at vera Gudi meir lýðin enn menniskjum. (Ápostlasøgan 5, 29).

17. grein: Um Krists afturkomu til dóms

Somuleiðis læra tey, at Kristus skal koma til sjóndar við heimsins enda at døma, og at hann skal vekja upp øll tey deyðu. Teimum gudrøknu og útvaldu skal hann geva ævigt lív og áhaldandi gleði, men tey ógudiligu og djevlarnar skal hann fordøma at líða endaleysa kvøl.

Tey fordøma endurdoypararnar, sum halda, at endi verður á revsingunum hjá teimum fordømdu menniskjunum og djevlunum.

Tey fordøma eisini onnur, ið nú fara um við jødiskum hugsanum, at undan uppreisn teirra deyðu skulu tey gudrøknu taka ræðið á heiminum, eftir at tey gudleysu allastaðni eru kúgað.

18. grein: Um hin fría viljan

Um hin fría viljan læra tey, at tann menniskjuligi viljin hevur eitt ávíst frælsi til at útinna eina samfelagsliga rættvísi og velja millum teir lutir, ið eru undirgivnir vit og skil. Men uttan Heilaga Andan er hann ikki mentur at fremja Guds rættvísi ella ta andaligu rættvísina, tí „eitt verðsligt menniskja tekur ikki ímóti tí, ið hoyrir Guds anda til“, 1. Kor. 2,14; men hon verður til í hjørtunum, tá ið tikið verður ímóti Heilaga Andanum gjøgnum orðið. Hetta sigur Augustin við eins nógvum orðum í 3. bók í Hypognosticon: „Vit viðganga, at øll menniskju hava ein frían vilja, ið ber orð fyri at hava gott skil; tó ikki so at hann uttan Gud er mentur at byrja, ella ið hvussu er, ikki at fullføra nakað av tí, ið hoyrir Gudi til, men bara gerningar, ið hoyra hesum lívi til, góðar ella ringar. Við „góðar“ meini eg teir, sum stava frá tí góða í natúrini, so sum at vilja arbeiða í bønum, at vilja eta og drekka, at vilja eiga ein vin, at vilja hava klæði, at vilja byggja eini hús, at vilja giftast, at vilja halda neyt, at læra seg kynstur til ymiskt gott, stutt sagt at vilja alt gott, ið viðvíkur hesum lívi. Alt hetta verður ikki verandi uttan guddómliga stýring, tí at frá honum og við honum er tað, og var tað. Men við „ringar gerningar“ meini eg slíkt, sum at vilja dýrka ein avgud, at forgera sær o.s.fr.“

19. grein: Um atvold syndarinnar

Um atvold syndarinnar læra tey, at hóast Gud skapar og uppiheldur natúrini, er tó atvold syndarinnar vilji teirra óndu, djevulsins og teirra gudleysu. Hjálpir Gud honum ikki, tá vendir

hann sær frá Gudi, sum Kristus sigur: „Tá ið hann talar lygn, talar hann av sínum egna," Jóh. 8,44.

20. grein: Um trúnna og góðar gerningar

Av órættum verða okkara menn skuldsettir fyri at forbjóða góðar gerningar. Tí bæði skriftir teirra um tey tíggju boðini, sum eru til skjals, og aðrar við sama evni vísa, at teir hava lært gagnliga um øll lívsins viðurskifti og skyldur, um hvørji lívsins viðurskifti og hvørjir gerningar, sum í einum og hvørjum kalli toknast Gudi. Áður gjørdu prædikumenn lítið av at læra um slíkt. Teir tóku bara fram barnsligar og óneyðugar gerningar, sum t.d. vissar høgtíðir, føstur, brøðraløg, pílagrímsferðir, halgimennadýrkan, rósukransar, klosturlív og tílíkt. Hetta leggja mótstøðumenn okkara nú av eftir áminning frá okkum, og teir prædika ikki hesar óneyðugu gerningar so nógv sum áður. Teir eru eisini farnir at nevna trúnna, sum fyrr á løgnan hátt varð tagd burtur. Teir læra nú, at vit ikki einans verða rættvísgjørd av gerningum, men binda saman trúgv og gerningar og siga, at vit verða rættvísgjørd av trúgv og gerningum. Henda læra er frægari enn hin fyrra, og hon kann veita størri ugga enn teirra gamla læra.

Av tí at læran um trúnna, sum eigur ovasta sess í kirkjuni, so leingi hevur ligið í gloymsku – øll mega ásanna, at í prædikum hevur verið steintøgn um trúarinnar rættvísi, og at einans læran um gerningarnar hevur verið havd á lofti í kirkjuni – hava prædikumenn okkara ámint kirkjuliðini um trúnna á henda hátt:

Í fyrsta lagi: gerningar okkara kunnu ikki gera okkum sátt við Gud ella vinna okkum fyrigeving syndanna og náðina. Hetta fáa vit einans við trúnni, tá ið vit trúgva, at vit fyri Krists skuld verða náðað. Tí hann er settur at vera einasti millummaður og einasta loysigjald, ið ger Faðirin sáttan við okkum. Tann, sum tí lítur á, at hann kann vinna sær náðina við gerningum, hann vanvirðir gerning Krists og náði hansara. Hann søkir sær ein veg til Guds við menniskjuligum mátti, og

ikki við Kristi, hóast Kristus hevur sagt um seg sjálvan: „Eg eri vegurin, sannleikin og lívið," Jóh. 14,6.

Henda læra um trúnna verður viðgjørd allastaðni hjá Paulusi: „Tí av náði eru tit frelstir við trúgv, og tað er ikki av gerningum o.s.fr.", Ef. 2,8-9.

Og eingin skal siga, at vit í spølni upphugsa eina nýggja tolking av Paulusi, tí alt hetta finna vit longu í vitnisburði fedranna. Augustin verjir í mongum bókum náðina og trúarrættvísina móti virði gerninganna. Og ikki stórt øðrvísi lærir Ambrosius í De vocatione gentium (um kall heidninganna) og aðrastaðni. Í De vocatione gentium tekur hann soleiðis til: „Endurloysingin við blóði Krists hevði verið vanvird, og kravið um menniskjuligar gerningar hevði ikki boygt seg fyri Guds miskunnsemi, um rættvísgeringin, sum fæst av náði, varð fingin við gerningum, ið gjørdir vóru frammanundan, so at hon ikki var gáva frá gevaranum, men løn hansara, ið arbeitt hevur."

Men hóast tey ókønu halda lítið um hesa læru, hava tó gudrøknar og óttafullar samvitskur gjørt ta sannroynd, at hon ber ríka troyst. Tí samvitskurnar verða ikki uggaðar av gerningum, hvørjir teir so eru, men einans av trúnni, tá ið tær hava fingið vissu fyri, at tær fyri Krists skuld eru vorðnar sáttar við Gud, soleiðis sum Paulus lærir: „Rættvísgjørd av trúgv hava vit tí frið við Gud", Róm. 5,1. Henda læra má í síni heild setast í samband við tað stríð, sum hin skelkaða samvitskan stendur í, og tað er ikki gjørligt at skilja hana uttan hetta stríð. Tí er tað lítið vert, sum tey ókønu og verðsligu halda um hana; tey halda jú, at hin kristna rættvísin er ikki øðrvísi enn hin samfelagsliga ella heimspekiliga.

Áður plágaði læran um gerningar samvitskurnar, og tær fingu ongan ugga av at hoyra evangeliið. Summi rak samvitskan út í oyðimørkina ella í klostrini, tí har vónaðu tey at kunna vinna sær náðina við klosturlívinum. Onnur finna upp á aðrar gerningar fyri at vinna sær náðina og gera fulnað fyri syndir sínar. Tí var tað alneyðugt at taka fram hesa læru um trúnna á Krist og endurnýggja hana, fyri at skelkaðum sam-

vitskum ikki skuldi vanta uggi, men at tær skuldu vita, at náðin og fyrigeving syndanna fáast við trúnni á Krist.

Eisini verða menniskju mint á, at orðið trúgv í hesum føri ikki bert merkir søguligan kunnleika; hann hava tey ógudiligu og djevulin eisini. Men tað merkir ta trúgv, ið ikki bara trýr søguni, men eisini søgunnar ávirkan, tað er hesi grein: syndanna fyrigeving, at vit við Kristi eiga náði, rættvísi og fyrigeving syndanna.

Tann, ið nú veit, at hann við Kristi eigur ein miskunnsaman Faðir, hann kennir av sonnum Gud; hann veit, at Gud hevur umsorgan fyri honum, og hann ákallar hann; stutt sagt: hann er ikki uttan Gud eins og heidningarnir. Men djevlarnir og tey ógudiligu kunnu ikki trúgva hesi grein: syndanna fyrigeving. Tí hata tey Gud, sum var hann fíggindi, ákalla hann ikki, og vænta sær einki gott frá honum. Eisini Augustin minnir á henda hátt lesaran á orðið trúgv og lærir, at í Skriftini merkir orðið trúgv ikki ein kunnleiki sum tann, ið tey ógudiligu hava, men tað merkir álit, og hetta álit troystar ræðsluslignar sálir og reisir tær upp.

Umframt hetta læra okkara menn, at tað er neyðugt at gera góðar gerningar, ikki í tí treysti, at vit við teimum skulu vinna okkum náðina, men tí tað er Guds vilji. Men fyrigeving syndanna og náðina fáa vit einans við trúnni. Og av tí at Heilagi Andin fæst við trúnni, verða nú hjørtuni endurnýggjað og fáa eitt nýtt sinnalag, so tey kunnu gera góðar gerningar. Soleiðis sigur Ambrosius: „Trúgvin er móðir at góða viljanum og rættvísu gerðini“. Tí uttan Heilaga Andan eru menniskjuligu kreftirnar fullar av ógudiligum lystum og ov veikar at avrika gerningar, ið eru góðir fyri Guds ásjón. Eisini eru tær í djevulsins valdi, og hann eggjar menniskjum til alskyns syndir, til ógudiligar hugsanir, til opinberar misgerðir, soleiðis sum tað er til skjals hjá heimspekingunum. Hóast teir royndu at liva sum reiðiligir menn, vóru teir tó ikki førir fyri tí, men gjørdust fongdir við mangar opinberar misgerðir. Soleiðis gongst menniskjanum í veikleika sínum, tá ið tað er uttan

trúgv og uttan Heilaga Andan og við menniskjuligum mátti eina roynir at hava tamarhald á sær sjálvum.

Av hesum sæst týðiliga, at tað ikki er rætt at skuldseta hesa læru fyri at forbjóða góðum gerningum; men nógv heldur eigur hon rós uppiborið, tí hon vísir, á hvønn hátt vit kunnu gera góðar gerningar. Tí uttan trúnna kann menniskjuliga natúrin á ongan hátt gera teir gerningar, sum fyrsta og annað boð krevja. Uttan trúgv ákallar hon ikki Gud, væntar sær einki frá Gudi, tolir ikki krossin, men søkir sær menniskjuliga hjálp og lítur á hana. Tá ið trúgvin og álitið á Gud eru burtur, ráða ovurhugi og menniskjuligar ráðagerðir í hjartanum. Tí hevur eisini Kristus sagt: „Uttan meg kunnu tit als einki gera," Jóh. 15,5. Og kirkjan syngur: „Uttan títt vald er einki í menniskjanum, einki, sum er uttan skuld."

21. grein: Um halgimennadýrkan

Um halgimennadýrkan læra tey, at tað er loyvt alment at minnast halgimenni, til tess at vit skulu taka eftir trúgv og góðu gerningum teirra samsvarandi kalli okkara, á sama hátt sum keisarin kann taka Dávid sum fyrimynd í stríðnum at reka turkarnar úr føðilandinum, tí at báðir eru kongar. Men Skriftin lærir okkum ikki at ákalla halgimenni ella at søkja okkum hjálp hjá teimum, tí einans Krist setur hon fram sum millummann, sáttargerð, høvuðsprest og talsmann. Hann eiga vit at ákalla, og hann hevur lovað at hoyra bønir okkara, og honum líkar væl hesa dýrkan, at vit ákalla hann í hvørji neyð. „Um onkur syndar, tá hava vit ein talsmann hjá Gudi o.s.fr.," 1. Jóh. 2,1.

Hetta er í stórum høvuðsinnihaldið í læru okkara, og sum tað sæst, er einki her, ið víkur frá Skriftini ella katólsku ella rómversku kirkjuni, soleiðis sum vit kenna hana frá kirkjufedrunum. Og eftir hesum fella tí teir ómildan dóm, ið krevja, at prædikumenn okkara verða taldir millum ranglærarar. Øll ósemjan er um nøkur fá misbrúk, ið uttan álítandi heimild hava sníkt seg inn í kirkjurnar. Og skuldi okkurt ósambæri verið á hesum øki við, so sømdi tað seg tó biskupunum at

víst ein slíkan mildleika, at teir vegna trúarjáttanina, sum vit beint nú hava lisið upp, toldu prædikumenn okkara. Tí enn ikki kirkjulógirnar eru so strangar, at tær krevja somu siðir allastaðni, og somu siðir hava heldur ongantíð verið í øllum kirkjum. Tó verður meginparturin av gomlu siðunum gjølla hildin hjá okkum. Tað er tí ein ósonn skuldseting, at allir halgisiðir, at allar gamlar fyriskipanir verða avløgd í okkara kirkjum. Men alment hevur verið funnist at, hvussu ávís misbrúk hingu við vanligu kirkjusiðirnar. Og av tí at tey ikki við góðari samvitsku kundu góðtakast, eru tey lutvíst rættað.

Seinni partur
Greinir, har tey misbrúk verða viðgjørd, ið broytt eru

Í ongari trúargrein víkja kirkjur okkara frá katólsku kirkjuni, men tær halda seg bert frá nøkrum fáum misbrúkum, sum eru nýggj og tikin upp av lýti tíðarinnar, men ímóti kirkjulógunum. Tí biðja vit um, at tygara keisaraliga hátign vil lýða á, bæði hvat ið er broytt, og hvørjar orsakirnar hava verið, at fólkið ikki er vorðið noytt ímóti samvitskuni at halda fast við hesi misbrúk. Tygara keisaraliga hátign má ikki trúgva teimum, sum bera út ímillum fólk løgin illmæli fyri at birta upp hatur í fólki móti okkum. Teir hava á henda hátt fingið sinni í góðar menn og longu frá fyrstu løtu elvt til hetta stríð, og nú royna teir so á sama hátt at gera ósemjuna verri. Tí uttan iva fer tygara keisaraliga hátign at koma eftir, at bæði læran og halgisiðirnir eru rímiligari hjá okkum, enn órættvís og illviljað menniskju siga frá. Annars finst sannleikin ikki í tosi hjá fjøldini og slatri hjá fíggindum. Men tað er lætt at skilja, at einki er so gagnligt fyri tign halgisiðanna og fyri virðingina og gudsóttan millum fólk sum tað, at halgisiðirnir verða hildnir á rættan hátt í kirkjuni.

22. grein: Um báðar lutirnar í sakramentinum

Báðir lutirnir í sakramentinum verða í kvøldmáltíð Harrans givnir leikfólkinum, tí at hesin siður er í samsvari við fyriskipan Harrans: „Drekkið allir harav," Matt. 26,27. Her skipar Kristus týðiliga fyri, at øll skulu drekka av kalikinum.

Og eingin skal koma við teirri undanførslu, at hetta einans viðvíkur prestunum, tí í brævinum til Korint (1. Kor. 11,20-23) nevnir Paulus eitt dømi, sum vísir, at alt kirkjuliðið hevur notið báðar lutir. Hesin siður helt sær leingi í kirkjuni, og eingin veit,

nær hann á fyrsta sinni varð broyttur, ella hvør ið broytti hann. Tó veit Cusanus kardinalur at siga, nær hesin siður fyrstu ferð er staðfestur. Cyprianus váttar í nøkrum støðum, at blóðið varð givið fólkinum. Tað sama váttar Hieronymus, sum sigur: „Prestarnir fara um kvøldmáltíðina og býta út blóð Krists til fólkið“. Ja, enntá Gelasius pávi forbjóðar at býta sundur sakramentið, Dist. 2. de consecratione, cap. Comperimus. Hetta broyttist fyrstani av einum vana, ið ikki er gamal. Men tað stendur fast, at tað eigur ikki at vera tikið við einum vana, sum er íkomin ímóti Guds boðum, sum eisini kirkjulógirnar staðfesta, Dist. 8. cap. Veritate og næstu kapitlarnir. Men hesin vani er ikki bara íkomin ímóti Skriftunum, men eisini ímóti gomlu kirkjulógunum og kirkjunnar fyridømi. Tí hevur tað ikki verið rætt at noyða tey at bera seg øðrvísi at, ið heldur vildu njóta sakramentið við báðum lutum, og soleiðis meina samvitsku teirra. Og av tí at tað ikki er í samsvari við innseting Krists at býta sakramentið sundur, plaga vit ikki at ganga í skrúðgongu við sakramentinum, sum vanligt hevur verið higartil.

23. grein: Um hjúnalag prestanna

Tað hevur verið klagað alment um tey vánaligu fyridømi, sum teir prestar vóru, ið ikki livdu eitt siðiligt lív. Tí skal eisini Pius pávi hava sagt, at grundirnar høvdu verið nógvar, at hjúnalag varð forboðið prestunum, men tær vóru enn fleiri, at tað átti at verið givið teimum aftur. Soleiðis skrivar Platina. Men av tí at prestar okkara vildu sleppa undan hesum almennu gølum, hava teir fingið sær konur og lært, at loyvt var at giftast. Í fyrsta lagi, tí at Paulus sigur: „Ein og hvør skal hava sína egnu konu fyri at forða siðloysi,“ 1. Kor. 7,2. Somuleiðis: „Tað er betri at gifta seg enn at brenna av girnd,“ 1. Kor. 7,9. Í øðrum lagi sigur Kristus: „Ikki øll fata hetta orðið,“ Matt. 19,11, har hann lærir, at ikki øll eru skikkað at liva ógift, tí Gud skapti menniskjað til at nøra seg, 1. Mósebók 1. Og tað stendur ikki í menniskjans makt at broyta skapanina uttan Guds serligu gávu og gerning.

Tí eiga tey, sum ikki eru skikkað at liva ógift, at giftast. Tí at Guds boð og Guds fyriskipan kann eingin menniskjulig lóg og einki lyfti seta úr gildi. Av hesum grundum læra prestarnir, at tað er loyvt teimum at giftast.

Tað kann eisini verða sagt við vissu, at prestarnir í teirri gomlu kirkjuni vóru giftir. Tí at bæði sigur Paulus, at til biskup eigur at verða valdur maður, sum er giftur (1. Tim. 3,2), og ikki fyrr enn fyri 400 árum síðan eru prestarnir í Týsklandi við makt noyddir at liva ógiftir. Teir settu seg so hart upp ímóti tí, at erkibiskupurin í Mainz næstan varð dripin í einum upplopi av sintum prestum, tá ið hann skuldi kunngera fyriskipan pávans. Og málið varð framt á ein so harðrendan hátt, at giftur ikki bert vórðu forbodnar í framtíðini, men enntá lóglig hjúnaløg vórðu upploys. Hetta var ímóti øllum menniskjuligum og guddómligum rætti, ja, enntá ímóti sjálvum kirkjulógunum, ið ikki bara pávar høvdu givið, men sum eisini vóru viðtiknar á mest umhildnu kirkjufundum.

Og tá ið mannanatúrin gerst veikari, so hvørt sum heimurin eldist, tá eigur at verða sæð til, at ikki fleiri ódygdir sníkja seg inn í Týskland.

Umframt hevur Gud innsett hjúnalagið at vera ráð fyri menniskjuliga veikleikanum. Sjálvar kirkjulógirnar siga, at tann strangleiki, sum av og á varð sýndur fyrr, í seinni tíðum eigur at verða linkaður, við tað at menniskjað er skroypiligt. Eftirynskjandi var, at hetta eisini var gjørt í hesi søk. Onkuntíð munnu eisini prestar fara at tróta kirkjunum, verður hjúnalagið framvegis forboðið.

Men tá ið Guds boð enn er til, tá ið siður kirkjunnar er alkunnigur, tá ið siðleysa ógiftan er atvoldin til størstu gølurnar, til siðloysi og onnur misbrot, ið hava uppiborið, at gott yvirvald revsar tey, tá er tað so mikið løgnari, at í ongari søk verður farið so strangliga fram, sum tá ið tað snýr seg um hjúnalag hjá prestum. Gud hevur fyriskipað at virða hjúnalagið; lógirnar í øllum væl skipaðum ríkjum, enntá hjá heidningunum, hava prýtt tað við miklum heiðri. Og nú verða fólk,

enntá prestar við, ímóti viljanum í kirkjulógunum plágað til deyða, einans tí at tey hava givið seg í hjúnalag. Paulus nevnir ta læruna, ið forbjóðar hjúnalag, djevulsins læru, 1. Tim. 4,1.3. Og tað er lætt at skilja, tá ið hjúnalagsforboðið verður vart við slíkum revsingum.

Men sum eingin menniskjulig lóg kann seta Guds boð úr gildi, soleiðis kann eitt lyfti heldur ikki. Tí ræður Cyprianus teimum kvinnum til at giftast, ið ikki halda givna lyftið um at liva eitt siðiligt lív. Orð hansara eru hesi, Lib. 1 epistularum, ep. 11: „Men vilja tær ikki ella kunnu tær ikki halda tað, tá er tað betri, at tær giftast, enn at tær við sínum lystum falla í girnd; í hvussu er mega tær ikki valda brøðrum sínum ella systrum meinboga."

Eisini kirkjulógirnar hava fyrilit við teimum, ið góvu lyfti, áðrenn tey vóru komin til rættan aldur, so sum vanligt hevur verið higartil.

24. grein: Um messuna

Av órættum verða okkara kirkjulið skuldsett fyri at avtaka messuna, tí hjá okkum verður hildið fast við messuna, og hon verður hildin við størstu virðing. Eisini verða næstan allir vanligir halgisiðir hildnir; tó verða umframt latínsku sálmarnar av og á brúktir týskir sálmar, sum eru ætlaðir fólkinum til lærdóms. Tí at halgisiðirnir eru eina mest neyðugir til lærdóms hjá teimum ólærdu. Eisini Paulus heldur, at í kirkjuni eigur tað mál at vera brúkt, sum fólkið skilur (1. Kor. 14). Fólkið venist við saman at brúka sakramentið, sum tey nú eru egnað til tess, og eisini tað økir virðingina og ærufryktina fyri almennu halgisiðunum. Tí eingi fáa atgongd, uttan at tey frammanundan eru roynd og hoyrd. Og fyri at fólk kunnu læra at trúgva á Gud og vænta og søkja alt gott frá honum, verða tey eisini mint á tign sakramentsins og tess rætta brúk, og hvussu stóra troyst tað veitir óttafullum samvitskum. Henda dýrkan gleðir Gud, og at brúka sakramentið á henda

hátt, nørir um gudrøknið. Tí tykist messan ikki verða hildin við størri ærufrykt hjá mótstøðumonnunum enn hjá okkum.

Men tað stendur fast, at allir góðir menn í longri tíð alment og so staðiliga hava klagað um, at messurnar verða vanhalgaðar á skammiligan hátt, við tað at tær verða brúktar at útvega peningaligan vinning. Tað er heldur einki loyndarmál, hvussu vanligt hetta misbrúk er í øllum kirkjum, og hvørji tey fólk eru, ið halda messur bara fyri løn ella ágóða, og hvussu mong tey eru, ið halda tær ímóti boðunum í kirkjulógunum. Men Paulus hóttir harðliga tey, sum fara ósømiliga um heilagu kvøldmáltíðina, tá ið hann sigur: „Tann, ið etur breyðið ella drekkur kalik Harrans óverduliga, verður sekur í likami og blóði Harrans," 1. Kor. 11,27. Tí hildu einstaklingamessurnar uppat hjá okkum, eftir at prestar okkara vórðu mintir á hesa synd, tí at næstan eingin einstaklingamessa varð hildin uttan fyri vinnings skyld.

Heldur ikki vóru biskuparnir óvitandi um hesi misbrúk; høvdu teir havt rættað tey, meðan tíð var, hevði ósemjan nú verið minni. Við síni líkasælu lótu teir áður nógvar ódygdir sníkja seg inn í kirkjuna. Nú eru teir endiliga farnir at gremja seg um kirkjunnar vanlukkur, hóast hesin ófriður ikki hevur havt nakra aðra grund enn nevndu misbrúk, sum vóru so opinlýs, at tey ikki kundu verða told longur. Stór ósemja stóðst um messuna, um sakramentið. Kanska má heimurin fáa revsing fyri so leingi at hava vanhalgað messuna, og tí teir, ið bæði kundu og áttu at rætta tað, í so nógvar øldir hava tolt hesi misbrúk í kirkjuni. Tí at skrivað stendur í teimum tíggju boðunum: „Tann, ið misbrúkar Guds navn, skal ikki vera órevsaður," 2. Mós. 20, 7. Men frá upphavi heimsins tykist einki guddómligt nakrantíð hava verið soleiðis misbrúkt fyri peningaligan vinning sum messan.

Afturat hesum kom tann hugsan, sum økti einstaklingamessurnar í tað óendaliga, at Kristus við líðing síni hevur gjørt fulnað fyri arvasyndina, og innsett messuna, har offur skuldi

verða borið fram fyri dagligu syndirnar, bæði deyðasyndir og tær, ið kunnu fyrigevast.

Haðani stavar vanliga hugsanin, at messan er ein gerningur, sum við gerðini sjálvari strikar út syndirnar hjá livandi og deyðum. Tá tók seg eisini upp kjakið um, hvørt ein messa, ið varð lisin fyri fleiri, hevði líka stórt virði sum tann, ið verður lisin fyri hvørjum einstøkum sær. Hetta kjak hevur íbirt hesar óteljandi messur.

Prædikumenn okkara hava mint á, at hesar hugsanir víkja frá heilagu Skriftunum og vanvirða heiðurin av líðingum Krists. Tí at líðing Krists var ikki bert offur og fulnaður fyri arvasyndina, men allar hinar syndirnar við, soleiðis sum skrivað stendur í Hebrearabrævinum: „Vit eru halgað eina ferð fyri allar við ofring av likami Jesu Krists," Hebr. 10,10. Og somuleiðis: „Við eittans ofri hevur hann með alla gjørt teir fullkomnar, ið halgaðir verða," Hebr. 10,14. Somuleiðis lærir Skriftin okkum, at vit verða rættvísgjørd fyri Gudi við trúnni á Krist. Men um nú messan einans við at verða hildin strikar út syndirnar hjá livandi og deyðum, tá fæst rættvísgeringin av gerningi messunnar, ikki av trúnni; men tað samsvarar ikki við Skriftina.

Men Kristus býður at gera tað til áminningar sínar. Messan er tí innsett, fyri at trúgvin hjá teimum, sum brúka sakramentið, skal minnast til, hvørjar vælgerningar hon fær við Kristi, og hon skal reisa upp og ugga ta óttafullu samvitskuna. Tí at minnast Krist, tað er at minnast vælgerðir hansara og skilja, at tær av sonnum verða givnar okkum. Tað er ikki nóg mikið at minnast søguna, tí hana minnast eisini jødar og ógudiligir. Messan eigur tí at verða hildin við tí endamáli, at sakramentið har verður givið teimum, ið tørvar ugga, eins og Ambrosius sigur: „Av tí at eg altíð syndi, eigi eg altíð at taka heilivágin."

Men av tí at sakramentið verður givið í messuni, verður hjá okkum ein vanlig messa hildin hvønn heiligdag – og eisini aðrar dagar, biður onkur um tað – har sakramentið verður givið teimum, ið biðja um tað. Hesin siður er ikki nýggjur í kirkjuni. Tí teir gomlu undan Gregoriusi umrøða ikki ein-

staklingamessur; men um vanligu messuna tala teir ofta. Chrysostomos sigur, at presturin stendur dagliga fyri altarinum og kallar summi til hina heilagu kvøldmáltíðina, men øðrum heldur hann aftur. Og av gomlu kirkjulógunum sæst, at bert ein einstakur hevur lisið messuna, og frá honum hava so hinir prestarnir og diakonarnir fingið Harrans likam. Soleiðis ljóða orðini í nikeisku kirkjulógini: „Samsvarandi vígslustigi sínum skulu diakonarnir aftan á prestunum taka ímóti heilagu kvøldmáltíðini frá biskupinum ella einum presti.“ Og viðvíkjandi heilagu kvøldmáltíðini skipar Paulus fyri, at hvør skal bíða eftir øðrum, fyri at tey í felag kunnu taka ímóti gávunum.

Tá nú messan hjá okkum sambært Skriftini og kirkjufedrunum fylgir fyrimynd kirkjunnar, so líta vit á, at tað ikki verður funnist at henni, serstakliga tá ið almennu halgisiðirnir fyri stóran part verða varðveittir í sama líki sum teir vanligu. Messurnar eru ikki líka nógvar; men tað var av sonnum gagnligt at minka um tær, tí misbrúkini vóru so stór og opinlýs. Tí at fyrr var ikki dagliga hildin messa allastaðni, enn ikki í fjølmentastu kirkjunum, sum eisini Historia Tripartita staðfestir, lib. 9: „Men í Aleksandria verða heilagu Skriftirnar lisnar hvønn mikudag og fríggjadag, og lærararnir útleggja tær, og har er alt uttan hin hátíðarliga offurgerðin.“

25. grein: Um skriftamálið

Skriftamálið er ikki avlagt í kirkjum okkara. Tí likam Harrans plagar ikki at verða givið øðrum enn teimum, ið frammanundan eru roynd og hava fingið avloysing. Og fólkið verður nágreiniliga kunnað um trúnna á avloysingina; um hetta hevur higartil verið steintøgn. Fólk verða lærd at hava stóra virðing fyri avloysingini, tí hon er Guds rødd og verður boðað eftir Guds fyriskipan. Lyklavaldið verður hildið høgt í metum, og mint verður á, hvussu stóran ugga avloysingin veitir óttafullum samvitskum. Mint verður eisini á, at Gud krevur trúgv, so vit trúgva hesi avloysing sum rødd hansara, ið ljóðar av himni, og

at henda trúgv av sonnum fær fyrigeving syndanna og ognast hana. Áður vórðu syndabøturnar hevjaðar til skýggja; men um trúnna og heiður Krists og trúarrættvísina varð ikki mælt orð. Tað eigur tí als ikki at verða funnist at okkara kirkjuliðum í hesi søk. Sjálvt okkara mótstøðumenn noyðast at viðganga, at prædikumenn okkara nágreiniliga hava viðgjørt og útgreinað læruna um bótina.

Men um skriftamálið læra tey, at tað ikki er neyðugt at rokna upp misbrotini, heldur ikki eiga samvitskurnar at verða plágaðar av stúran fyri, um nú øll misbrot eru nevnd. Tí tað er ógjørligt at rokna upp øll misbrot, eins og staðfest verður í sálminum: „Hvør kennir misbrotini?“ Sl. 19,13 og hjá Jeremia: „Mannahjartað er rangvørgt og órannsakandi“, Jer. 17,9. Vórðu einans tær syndir fyrigivnar, ið upproknaðar verða, tá høvdu samvitskurnar ongantíð fingið frið, tí tær hvørki síggja ella minnast flestu syndirnar. Eisini kirkjufedrarnir vátta, at ein slík upprokning er óneyðug. Í løgskipanini verður soleiðis tikið upp eftir Chrysostomosi: „Eg sigi ikki við teg, at tú alment skalt avdúka teg ella ákæra teg sjálvan fyri øðrum; men eg vil, at tú ert profetinum lýðin, tá ið hann sigur: „Opinbera veg tín fyri Gudi“ (Sl. 37, 5). Játta tí í bøn syndir tínar fyri Gudi, hinum sanna dómara. Ber fram misbrot tíni, ikki við tunguni, men soleiðis sum samvitskan minnist tey.“ Eisini frágreiðingin „de poenitentia“ Dist. 5. in cap. Consideret, viðgongur, at skriftamálið er í samsvari við menniskjuligan rætt. Men vit halda fast við skriftamálið, tí at avloysingin ber í sær stórar vælgerðir, og tí at tað hevur aðrar gagnligar ávirkanir á samvitskurnar.

26. grein: Um mun á mati

Tað hevur verið vanliga fatanin, ikki bara hjá almúguni, men eisini hjá lærarunum í kirkjuliðunum, at tað at gera mun á mati og aðrir tílíkir mannasiðir eru gerningar, ið gagnligir eru at vinna sær náðina við, og at teir gera fulnað fyri syndirnar. At heimurin hevur havt hesa fatan sæst av, at dagliga vórðu

fyriskipaðir nýggir halgisiðir, nýggjar klosturskipanir, nýggir høgtíðisdagar, nýggjar føstur. Og lærararnir í kirkjunum kravdu hesar gerningar gjørdar, sum vóru teir ein gudsdýrkan, ið var neyðug fyri at vinna náðina. Teir loyptu tí miklan ekka á samvitskurnar, um tær gloymdu okkurt. Henda fatan av siðaarvinum hevur volt kirkjuni nógvar ónáðir.

Í fyrsta lagi kámaðist læran um náðina og trúarrættvísina. Hon er høvuðsparturin í evangeliinum og eigur at vera tað sjónskasta í kirkjuni, so heiður Krists verður alkunnigur, og trúgvin, ið trýr, at syndirnar verða fyrigivnar fyri Krists skuld, verður hátt hevjað yvir gerningar og alla aðra gudsdýrkan. Tí leggur Paulus sær eisini serliga nær við hesum; lógina og menniskjuliga siðaarvin leggur hann til viks fyri at vísa, at kristna rættvísin er annað enn gerningar av hesum slagi; hon er tann trúgvin, ið trýr, at vit verða náðað fyri Krists skuld. Men siðaarvurin, sum gav fólki ta fatan, at tað er neyðugt at vinna náðina og rættvísina við at gera mun á mati og við aðrari tílíkari dýrkan, beindi næstan burtur hesa læru Paulusar. Í bótini varð ikki talað um trúnna, bert syndabøturnar vórðu tiknar fram. Hildið varð, at øll bótin var í teimum.

Í øðrum lagi kámaði hesin siðaarvur Guds boð, við tað at hann varð tikin fram um tey. Hildið varð, at kristindómurin í síni heild var at halda ávísar høgtíðisdagar, siðir, føstur og bera ávísar klædnabúnar. At gera hetta fekk heiðurligastu heiti, sum var tað andaliga og fullkomna lívið sjálvt. Men Guds boðum, sum ein og hvør sambært kalli sínum eigur at gera eftir, varð eingin virðing sýnd, eitt nú at húsbóndin aldi upp børn síni, at móðirin átti børn, at fúrstin stjórnaði ríkinum. Hetta varð hildið at vera verðsligir og ófullkomnir gerningar og nógv ringari enn áðurnevndu virðismiklu siðir. Henda villa píndi nógv tær gudrøknu samvitskurnar; tær syrgdu um at verða bundnar at einum ófullkomnum lívsháttí, í hjúnalagi, í embætisstørvum ella av øðrum almennum skyldum; men tær settu munkar og teirra líkar høgt og hildu av órættum lívsháttí teirra vera Gudi tekkiligari.

Í triðja lagi var siðaarvurin ein stórur vandi fyri samvitskurnar, tí tað var ógjørligt at halda allar siðir, og tó hildu fólk hetta siðahald vera eina neyðuga dýrkan. Gerson skrivar, at vónloysi fekk vald á mongum, og einstøk tóku seg enntá av døgum, tí tey kendu á sær, at tey kundu ikki fullgera siðaarvin. Tey høvdu heldur onga troyst hoyrt frá trúarrættvísini og náðini. Vit síggja, at summistar og gudfrøðingar savna siðaarv og royna at finna umberingar fyri at veita samvitskunum ein linna. Tað er tó eingin verulig loysn, men av og á seta teir heldur fellur fyri samvitskurnar. Og skúlar og prædikur gjørdu so nógv burturúr at savna siðaarv, at ikki vóru stundir at fáast við Skriftina og sóknast eftir gagnligaru læruni um trúnna, um krossin, um vónina, um virðið í almennu størvunum, um ugga til samvitskurnar, ið nívdar vórðu av iva. Tí hava Gerson og aðrir gudfrøðingar álvarsliga kært seg um, at hetta stríð um siðaarvin forðaði teimum í at takast við eitt betri slag av læru. Og Augustin forbjóðar at tyngja samvitskurnar við siðahaldi av slíkum slagi og minnir klókliga Januarius á, at hann eigur at vita, at siðaarvurin skal verða hildin, hóast tað ongan týdning hevur. Soleiðis talar hann.

Tí má eingin halda, at kirkjur okkara uttan grund ella av hatri til biskuparnar hava tikið hetta mál upp, soleiðis sum summi av órættum halda. Tað var alneyðugt at minna kirkjuliðini á hesar villur, sum stavaðu frá, at fólk høvdu misskilt siðaarvin. Tí evangeliið noyðir okkum í kirkjuni at leggja dent á læruna um náðina og trúarrættvísina. Men hetta skilja menniskju ikki, um tey halda, at tey vinna sær náðina, halda tey teir siðir, ið tey sjálv hava valt.

Kirkjur okkara hava tí lært, at vit vinna okkum ikki náðina ella gera fulnað fyri syndirnar við at halda mannasiðir, og tí má eingin halda, at tílíkt siðahald er ein neyðug gudsdýrkan. Aftur at hesum vísa tær til vitnisburðir úr Skriftini. Kristus umber í Matteusarevangelium 15,9 ápostlarnar, sum ikki høvdu hildið eina vanliga viðtøku, sum tyktist snúgva seg um tað, ið menniskju sjálv kunnu avgera, og hava okkurt við

reinsanir í lógini at gera. Men hann sigur: „Til einkis dýrka tey meg við mannaboðum.“ Hann krevur tískil onga óneyðuga dýrkan. Og eitt sindur seinni leggur hann afturat: „Tað, sum fer inn gjøgnum munnin, ger ikki menniskju órein“ Matt. 15, 11. Somuleiðis: „Guds ríki er ikki eting og drekking“, Róm. 14,17, og Kolossubrævið 2,16: „Latið ongan døma tykkum fyri mat, drekka, hvíludagar ella høgtíðsdagar“. Í Ápostlasøguni 15,10-11 sigur Pætur: „Hví freista tit Gud við at leggja ok á nakkan á lærusveinunum, sum hvørki vit ella fedrar okkara orkaðu at bera? Men vit trúgva, at vit verða frelstir við náði várs Harra Jesu Krists á sama hátt sum tey“. Her forbjóðar Pætur at tyngja samvitskurnar við fleiri siðum, antin teir eru frá Mósesi ella øðrum. Og 1. Timoteusarbræv 4,13 nevnir forboðið ímóti mati djevulsins læru, tí tað er ímóti evangeliinum at fyriskipa ella gera slíkar gerningar, fyri at vit við teimum skulu vinna náðina, sum var kristna rættvísin ikki til uttan slíka dýrkan.

Her tala mótstøðumenninir at og siga, at okkara menn eins og Jovinianus forbjóða aga og at deyða holdið. Men í skriftunum hjá lærarum okkara kemur nakað annað til sjóndar. Tí læra teirra hevur altíð snúð seg um krossin, at kristin menniskju eiga at tola trongdir. Hetta er hin sanna og álvarsama deyðingin: í ymisligum trongdum at verða vand og krossfest við Kristi, og hon er ikki upp á kvamsvís.

Aftur at hesum læra teir, at hvørt kristið menniskja eigur við aga og likamligum íðkanum og verkum at venja og temja seg sjálvt, til tess at ikki yvirflóð ella leti skulu eggja til synd, men als ikki fyri við hesum íðkanum at vinna syndanna fyrigeving ella gera fulnað fyri syndirnar. Dentur eigur altíð at verða lagdur á henda likamliga aga og ikki bert á nakrar fáar ávísar dagar, eins og Kristus býður: „Varið tykkum, at ikki hjørtu tykkara verða tyngd av drykkjuskapi,“ Luk. 21,34. Somuleiðis: „Illir andar av hesum slagi verða ikki riknir út uttan við føstu og bøn,“ Mark. 9,29. Og Paulus sigur: „Eg revsi mítt likam og haldi tað í trældómi,“ 1. Kor. 9,27. Her vísir hann týðiliga, at hann ikki revsar likam sítt, fyri at hann við hesum aga skal

vinna sær syndanna fyrigeving, men fyri at hann kann hava eitt likam, ið er undirgivið og í samsvari við kall hansara er skikkað at gera andaligar gerningar og skyldu sína. Sjálvar føsturnar verða ikki fordømdar, men teir siðir, ið fyriskipa ávísar dagar, ávísan mat, sum vóru slíkir gerningar ein neyðug dýrkan. Tí harvið koma teir samvitskunum í vanda.

Tó verður meginparturin av siðaarvinum hildin hjá okkum, serstakliga tann parturin, sum tryggjar gott skil í kirkjuni, sum til dømis skipanin við bíbliulestrum í messuni o.s.fr. Men tó verða fólk mint á, at ein slík gudsdýrkan ikki ger nakran rættvísan fyri Gudi, og at tað ikki eigur at verða mett sum synd, um tílíkt verður slept, kann tað verða gjørt uttan at valda nøkrum ástoyt. Hetta frælsið, tá ið um mannasiðir ræður, var ikki fedrunum fremmant. Tí í Eysturlondum vórðu páskirnar ikki hildnar um somu tíð sum í Róm, og tá ið rómverjar tessvegna skuldsettu Eysturlond fyri kirkjuskilnað, mintu aðrir teir á, at slíkir siðir nýttust ikki at vera teir somu allastaðni. Irenæus sigur: „Ósemja um føstuna upploysir ikki einleikan í trúnni," og í Distinc. 12. ger Gregorius pávi kunnugt, at ein slíkur munur skaðar ikki einleika kirkjunnar. Og í Historia Tripartita lib. 9 eru mong dømi um ólíkar siðir, og har standa hesi orð: „Tað var ikki ætlan ápostlanna at seta í gildi fyriskipanir um heiligdagar, men at prædika gott siðalag og gudsótta."

27. grein: Um klosturlyftini

Læra okkara um klosturlyfti er lættari at skilja, um havt verður í huga, hvussu støðan var í klostrunum, og hvussu nógv dagliga fór fram har, sum var ímóti kirkjulógunum. Á Augustins døgum vóru tey frælsir búfelagsskapir; men seinni komu allastaðni skipaðu viðurskiftini í forfall. Fyri at fáa hetta aftur í rættlag, vórðu tá kravd lyfti rætt sum í einum listilærdum fangahúsi. Umframt lyftini kom so við og við mangt annað afturat, sum eisini skuldi haldast. Og hesar leinkjur vórðu ímóti kirkjulógunum lagdar á mong, áðrenn tey vóru komin til

lógligan aldur. Mong hava av misgáum valt hetta lív; tí hóast tey høvdu aldurin, vóru tey tó ikki før fyri at meta um egnan mátt. Tey, sum soleiðis vórðu lokkað, vórðu noydd at verða verandi, hóast summi eftir kirkjunnar lógum kundu fingið frælsið aftur. Hetta hendi enntá oftari í nunnuklostrum enn munkaklostrum, hóast størri varsemi átti at verið víst veikara kyninum. Hesin strangleiki fall eisini áður mongum góðum manni fyri bróstið. Teir sóu, hvussu ungar gentur og ungir dreingir vórðu rikin inn í klostrini fyri at fáa til lívsins uppihald. Og teir sóu eisini ringu fylgjurnar av hesi framferð, hvussu hon argaði og setti fellur fyri samvitskurnar. Tað harmaði teir, at tann myndugleiki, sum kirkjulógirnar høvdu, fullkomiliga varð lagdur til viks og vanvirdur í einum so vandamiklum máli. Umframt alt hetta illa var eisini fatanin av lyftunum vorðin so, at hon fall enntá munkunum fyri bróstið, í hvussu er teimum vitugaru.

Teir søgdu, at lyftini vóru javnbjóðis við dópin; teir lærdu, at teir við hesum lívi vunnu sær fyrigeving syndanna og rættvísi fyri Gudi. Og teir løgdu enntá afturat, at klosturlívið gav meir enn rættvísi fyri Gudi, tí ikki bert Guds boð vórðu hildin, men eisini evangelisku ráðini. Á henda hátt royndu teir at sannføra fólk um, at klosturlyftið var nógv betri enn dópurin, og at klosturlívið var meira vert enn lívið hjá embætismonnum, prestum og teirra líkum, sum eftir Guds boðum tæna í kalli sínum uttan sjálvgjørdar gudrøkisgerningar. Hetta kann eingin reingja, tí tað stendur í bókum teirra.

Men hvat hendi seinni í klostrunum? Áður vóru tey skúlar, sum góvu upplæring í heilagu skriftunum og øðrum lærugreinum, ið gagna kirkjuni, og prestar og biskupar komu haðani. Nú er støðan øðrvísi; men ikki er neyðugt at nevna tað, ið øllum er kunnugt. Fyrr komu tey saman at læra; nú billa tey sær inn, at tað er eitt lívslag, sum er innsett at vinna sær náði og rættvísi við; ja, teir kunngera, at tað er stættur fullkomileikans, og seta tað nógv hægri enn allar aðrar lívshættir, ið Gud hevur fyriskipað. Hetta hava vit nevnt uttan

hatskliga at gera ov mikið av, fyri at tað skal vera lættari at skilja læruna hjá prædikumonnum okkara í hesi søk.

Í fyrsta lagi: viðvíkjandi teimum, sum ganga í hjúnalag, læra teir, at tað er loyvt øllum at giftast, sum ikki eru før fyri at liva ógift, tí at lyfti kunnu ikki seta Guds fyriskipan og boð úr gildi. Men hetta er Guds boð: „Vegna siðloysi skal hvør maður hava sína egnu konu," 1. Kor. 7,2. Og ikki einans boðið, men eisini skapanin og Guds fyriskipan noyða tey at giftast, sum ikki eru undantikin av Guds serligu uppílegging, sum skrivað stendur: „Ikki er gott, at maðurin er einsamallur," 1. Mós. 2,18. Tí synda tey ikki, ið eru hesum boði og hesi fyriskipan Guds lýðin.

Hvat kann verða mælt ímóti hesum? Ein kann seta skylduna, sum lyftið áleggur, so høgt, honum lystir; hann kann tó ikki fáa í lag, at lyftið setir Guds boð úr gildi. Kirkjulógirnar læra, at í hvørjum lyfti er rættur hins hægsta undantikin; tí hava hesi lyfti nógv minni gildi enn Guds boð.

Men kundu ongar umstøður hugsast, ið broyta kundu ta skyldu, sum lyftini áleggja, tá kundu pávarnir heldur ikki givið undantaksloyvi. Tí tað er ikki loyvt manni at seta úr gildi eina skyldu, sum beinleiðis stavar frá guddómligum rætti. Men pávarnir hava klókliga dugað at skilt, at tað eigur at verða víst mildi, hvat hesi skyldu viðvíkur; tí stendur ofta at lesa, at teir hava loyst fólk frá lyftunum. Kend er søgan um aragonakong, sum kallaður varð úr klostrinum; og heldur ikki úr okkara tíð vanta dømi.

Tínæst kundi verið spurt, hví mótstøðumenninir leggja so stóran dent á ta skyldu ella ávirkan, sum lyftini hava, men tiga um lyftið sjálvt: at tað eigur at snúgva seg um tað, ið gjørligt er, at tað eigur at verða sjálvboðið og givið vitandi og við vilja. Men um tað stendur í menniskjans makt alsamt ógift at liva siðiliga, tað vita øll. Og hvussu mong munnu tey vera, ið givið hava lyftið sjálvkravd, vitandi og við vilja? Ungar gentur og ungir dreingir verða yvirtalað at geva lyfti, áðrenn tey duga at meta um fylgjurnar, ja, av og á verða tey enntá noydd til tað. Tað er tí ikki rímiligt at kjakast so harðliga um skylduna; øll

viðganga tó, at tað er ímóti lyftinum sjálvum, verður tað ikki givið sjálvkravt og væl umhugsað.

Flestu kirkjulógirnar lýsa tey lyfti ógildug, sum givin verða innan 15 ára aldur, tí undan hesum aldri tykjast evnini at skyna á ikki vera so stór, at avgerðir kunnu takast fyri alt lívið. Ein onnur kirkjulóg, sum ásannar veikleika menniskjans, leggur nøkur ár afturat. Hon forbjóðar at geva lyfti innan 18 ára aldur. Men hvørji skulu vit fylgja? Meginparturin hevur eina umbering fyri at fara úr klostrunum, tí tey flestu hava givið lyfti, áðrenn tey komu til henda aldur.

Endiliga, hóast tað kann vera funnist at lyftisbroti, so tykist tó ikki neyðuga fylgjan av tí vera, at hjúnalagið hjá slíkum fólkum skal verða upploys. Tí Augustin sýtir fyri, at tey mega verða upploys, 27. quast. I., cap. Nuptiarum, og hansara myndugleiki er ikki lítilsverdur, hóast aðrir seinni hava hildið øðrvísi.

Men hóast Guds boð um hjúnalagið tykjast loysa tey flestu frá lyftunum, nevna tó okkara menn eisini eina aðra atvold til, at lyftini eru ógildug. Og tað er, at ein og hvør gudsdýrkan, sum menn hava fingið í lag uttan Guds boð, og sum er útvald at útvega rættvísgering og náði, er gudleys, sum eisini Kristus sigur: „Til einkis dýrka tey meg við mannaboðum," Matt. 15,9. Og Paulus lærir allastaðni, at eingin má søkja sær rættvísi við tænastum ella siðum, ið menniskju hava funnið uppá, men rættvísin gerst við trúnni lutur teirra, ið trúgva, at Gud fyri Krists skuld náðar tey.

Men tað stendur fast, at munkar hava lært, at sjálvgjørdir gudrøkisgerningar gera fulnað fyri syndir og vinna náði og rættvísgering. Hvat er hetta annað enn at minka um heiður Krists og káma og avnokta trúarrættvísina? Av hesum sæst, at vanligu lyftini hava verið ein gudleys dýrkan, og tey eru tí ógildug. Tí eitt lyfti, sum er gudleyst og givið ímóti Guds boðum, hevur ikki gildi; eitt lyfti eigur, sum kirkjulógin sigur, ikki at vera eitt órættvísisboð.

Paulus sigur: „Tit eru komin burtur frá Kristi, tit sum verða rættvísgjørd við lógini, tit eru fallin úr náðini," Gal. 5,4. Tí

koma eisini tey, sum vilja verða rættvísgjørd við lyftum, burtur frá Kristi og falla úr náðini. Tí tey, sum geva lyftunum æruna av rættvísgeringini, geva egnum gerningum æruna av tí, ið hoyrir heiðri Krists til. Tað kemst heldur ikki uttanum, at munkar hava lært, at teir verða rættvísgjørdir og vinna sær fyrigeving syndanna við lyftum og egnum lýdni. Ja, teir hava funnið upp á tað, sum er enn órímiligari; teir hava reypað av, at teir lótu øðrum gerningar sínar. Hevði onkur hatskliga viljað gjørt nógv burtur úr hesum, hvussu nógv kundi hann tá ikki drigið fram, sum sjálvt munkarnir nú skammast av! Tí teir hava eisini billað fólki inn, at sjálvgjørdu gudrøknisgerningarnir eru stættur kristna fullkomileikans. Er tað ikki at geva gerningunum heiðurin av rættvísgeringini? Tað er at valda ástoyt við lít í kirkjuni at leggja fram fyri fólkið eina ávísa dýrkan, ið menniskju hava funnið uppá uttan um Guds boð, og læra, at ein slík dýrkan rættvísger menniskju. Tí í kirkjuni eigur fram um alt trúarrættvísin at verða lærd, men hon kámast, tá ið henda „undurfulla eingladýrkan“ og eitt eiti av fátækdømi og eyðmýkt og ógiftu verða sett menniskjum fyri eygu.

Eisini kámast Guds boð og hin sanna gudsdýrkanin, tá ið menniskju hoyra, at einans munkarnir hoyra fullkomileikans stætt til. Tí kristiligur fullkomileiki er álvarliga at óttast Gud og við styrktari trúgv líta á, at vit fyri Krists skuld eiga ein sáttan Gud, trúliga at biðja um og við vissu at vænta sær hjálp frá honum í øllum tí, sum skal avrikast sambært kallinum, og ímeðan alment vanda sær um góðar gerningar og kallið. Hetta er hin sanni fullkomileikin og hin sanna gudsdýrkanin, men ógifta ella bidding ella skitin klæði eru tað ikki. Tí fáa fólk nógvar skaðiligar meiningar av hesum ósonnu lovsongum um klosturlívið. Tey hoyra, hvussu ógiftan verður lovprísað, og tí liva tey við ringari samvitsku í hjúnalagnum. Tey hoyra, at einans biddarar eru fullkomnir, og tí fáa tey samvitskubit av at eiga ognir og hava handil. Tey hoyra, at tað bara eru eini evangelisk ráð, sum forbjóða hevnd, og tí óttast summi als ikki at hevna seg; tey hoyra jú, at hevnd verður forboðin við

einum ráði, ikki við einum boði. Uppaftur fara onnur enn meiri skeiv, við tað at tey halda, at øll embæti hjá yvirvaldinum og øll samfelagsstørv eru kristnum menniskjum óverdig og ímóti evangeliska ráðnum.

Dømi eru at lesa um menniskju, sum eru rýmd úr hjúnalagnum og ríkisstjórnini, og sum hava krógvað seg í klostrum. Tey kallaðu tað at flýggja frá heiminum og at søkja sær ein heilagan lívsháttt. Tey dugdu ikki at skilja, at tey áttu at tæna Gudi eftir teimum boðum, ið hann sjálvur hevur givið, og ikki eftir boðum, sum menniskju hava funnið uppá. Tað er ein góður og fullkomin lívsháttur, ið hvílir á Guds boðum. Hetta er neyðugt at minna fólk á.

Fyri hesar tíðir finst Gerson at munkunum, tí teir eru á skeivari leið, hvat ið fullkomileikanum viðvíkur, og hann staðfestir, at í sínari tíð var tað nakað nýtt, at klosturlívið skuldi vera stættur fullkomileikans.

Tað loða so nógvar ógudiligar hugsanir upp við lyftunum: at tey rættvísgera, at tey eru hin kristni fullkomileikin, at munkarnir halda evangelisku ráðini og boðini, og at teir eiga avlopsgerningar. Av tí at alt hetta er rangt og einkisvert, ger tað lyftini ógildug.

28. grein: Um kirkjuliga valdið

Fyrr hava verið stórar ósemjur um myndugleika biskupanna, og summi hava á ósømiligan hátt blandað saman kirkjuliga valdið og valdið hjá svørðinum. Av hesi fløkju hava staðist verstu kríggj og størsti ófriður, við tað at pávarnir í treysti til lyklavaldið ikki bara hava innsett nýggjar dýrkanir og við fyrivarnum í serligum førum og fyrilitsleysum bannsetingum hava tyngt samvitskurnar, men teir hava eisini roynt at broyta verðsligar stjórnir og taka valdið frá keisarum. Hesi mistøk hava gudrøknir og lærdir menn í kirkjuni langt síðani átalað. Fyri at læra upp á samvitskurnar vóru tí okkara menn noyddir at vísa á munin millum kirkjuliga valdið og valdið hjá svørðinum, og teir hava lært, at eftir Guds boði eigur báðum at

verða sýnd størsta æra og størsti heiður, so satt sum tey eru Guds størstu vælgerðir á jørð.

Men tey halda, at lyklavaldið ella vald biskupanna sambært evangeliinum er valdið ella heimildin frá Gudi at boða evangeliið, at fyrigeva syndir ella halda teimum aftur og at fara um sakramentini. Tí Kristus sendir ápostlarnar við hesum boðum: „Eins og Faðirin hevur sent meg, soleiðis sendi eg eisini tykkum. Takið við Heilagum Anda! Hvørjum, sum tit fyrigeva syndir, teimum eru tær fyrigivnar, og hvørjum, sum tit halda teimum aftur, eru tær afturhildnar," Jóh. 20, 21-23. Og Markus: „Farið út um allan heimin og kunngerið gleðiboðskapin fyri øllum skapninginum o.s.fr.," Mark. 16,15.

Hetta vald verður einans útint við at læra ella prædika evangeliið og býta út sakramentini antin til nógv ella fá samsvarandi kallinum, tí tað eru ikki likamligir, men ævigir lutir, ið her verða givnir: ævig rættvísi, Heilagi Andin, ævigt lív. Hetta fæst ikki uttan við orðsins og sakramentanna tænastu, sum eisini Paulus sigur: „Evangeliið er ein Guds kraft til frelsu fyri hvønn tann, sum trýr," Róm. 1,16. Og sálmurin: „Orð títt ger meg livandi," Sl. 119,50. Tá ið nú kirkjuliga valdið veitir ævigar lutir og einans verður útint við orðsins embæti, tá er tað eingin bági fyri ríkisvaldið, líka lítið sum sanglistin er tað. Tí at ríkisvaldið fæst við annað enn tað, evangeliið snýr seg um. Yvirvaldið verjir ikki sálirnar, men tað verjir likamini og likamligu lutirnar fyri opinberum órætti og noyðir menniskju við svørðinum og likamligum revsingum. Evangeliið verjir sálirnar fyri ógudiligum áskoðanum, fyri djevlinum og ævigum deyða.

Tí eiga kirkjuliga og ríkisliga valdið ikki at verða samanblandað. Kirkjuliga valdið hevur sína heimild at læra evangeliið og fara um sakramentini. Tað má ikki bróta inn á fremmant yvirvaldsøki, ikki broyta heimsins stjórnir, ikki taka av yvirvaldsins lógir, ikki seta úr gildi lógarlýdni, ikki forða at rættarkanna almennar fyriskipanir og sáttmálar, ikki við lógum fyriskipa yvirvøldunum, hvussu stýrisskipanin eigur at vera,

sum eisini Kristus sigur: „Ríki mítt er ikki av hesum heimi," Jóh. 18,36. Somuleiðis: „Hvør hevur sett meg til dómara ella skiftingarmann tykkara millum?" Luk. 12,14. Og Paulus sigur: „Borgaraskapur okkara er í himli," Fil. 3,20, og: „Stríðsvápn okkara eru ikki holdlig, men máttug fyri Gudi til at bróta niður tankar o.s.fr.," 2. Kor. 10,4.

Soleiðis skilja kirkjulið okkara ímillum tær skyldur, sum hvørt valdið sær hevur, og tey bjóða at vísa báðum heiður og at viðurkenna, at bæði eru Guds gáva og vælgerð.

Hava biskuparnir nakað vald við svørði, tá hava teir tað ikki sum biskupar við heimild frá evangeliinum, men eftir menniskjuligum rætti, sum kongar og keisarar alment hava givið teimum at umsita góðs teirra. Men hetta er nakað annað enn embætið at boða evangeliið.

Tá ið spurt verður um myndugleika biskupanna, eigur at vera gjørdur skilnaður millum verðsliga vald teirra og kirkjuliga myndugleikan. Eftir evangeliinum – ella sum sagt verður, við guddómligum rætti – er hesin myndugleiki framvegis tilskilaður biskupunum sum biskupum, tað er sum teimum, ið fingið hava orðsins og sakramentanna embæti. Og hesin myndugleiki er at fyrigeva syndir, at vraka ta læru, ið víkur frá evangeliinum, og at útihýsa teimum vantrúnu, hvørs gudloysi er væl kent, frá felagsskapinum í kirkjuni uttan at brúka menniskjuligt vald, men við orðinum eina. Her er tað neyðugt og í samsvari við guddómligan rætt at kirkjuliðini eru teimum lýðin sambært hesum orðum: „Tann, sum hoyrir tykkum, hoyrir meg," Luk. 10,16.

Men læra ella fyriskipa teir eitthvørt, sum er ímóti evangeliinum, tá hava kirkjuliðini eini boð frá Gudi um ikki at vera lýðin: „Varið tykkum fyri svikaprofetum," Matt. 7,15. „Um ein eingil av himni boðaði tykkum ein annan gleðiboðskap, hann veri bannaður," Gal. 1,8, „Tí at vit eru einki mentir ímóti sannleikanum, men fyri sannleikanum," 2. Kor. 13,8. Somuleiðis: „Okkum er givið vald til uppbyggingar, ikki til niðurbrótingar", 2. Kor. 10,8. Soleiðis fyriskipa eisini kirkjulógirnar, II. quaest. VII. cap. Sacerdotes

et cap. Oves. Og Augustin sigur í brævinum ímóti Petilian: „Tað eigur ikki at verða givið katólsku biskupunum viðhald, fara teir kanska onkustaðni skeivir og læra ikki samsvarandi Guds heilagu skriftum.“

Hava biskuparnir nakað annað vald ella nakran myndugleika at kanna ávís mál, eitt nú viðvíkjandi hjúnalagi ella tíggjund o.s.fr., tá hava teir tað sambært menniskjuligum rætti; men himprast biskuparnir í slíkum málum, tá hava fúrstarnir sjálvt ímóti egnum vilja skyldu til at fella dóm yvir tegnar sínar fyri at tryggja lóg og landaskil.

Umframt hetta verður tosað um, hvørt biskupar ella prestar hava rætt at fyriskipa halgisiðir í kirkjuni og geva lógir um mat, høgtíðir, tign og stætt klerkanna o.s.fr. Tey, ið játta biskupunum henda rætt, nevna sum grundgeving orðini: „Enn havi eg nógv at siga tykkum, men tit eru ikki mentir at bera tað nú. Men tá ið hann kemur, sannleikans andi, tá skal hann vegleiða tykkum til allan sannleikan,“ Jóh. 16,12-13. Tey nevna eisini fyridømi ápostlanna, sum kravdu, at fólk skuldu halda seg frá blóði og tí kvalda. Sabbáturin, sum tykist vera broyttur til sunnudag ímóti teimum tíggju boðunum, verður nevndur. Og einki dømi verður oftari tikið fram enn sabbátsbroytingin. Teir halda uppá, at vald kirkjunnar má vera stórt, tá ið hon hevur kunnað givið undantaksloyvi frá einum av teimum tíggju boðunum.

Hvat hesum spurningi viðvíkur, læra okkara menn, at biskuparnir einki vald hava at áseta nakað, sum er ímóti evangeliinum, sum víst er á frammanfyri. Hetta vátta eisini kirkjulógirnar, Distinct. 9 í síni heild. Og so er tað eisini ímóti Skriftini at íbirta siðir, fyri at vit við teimum skulu gera fulnað fyri syndir okkara ella vinna okkum rættvísgering. Tað er at vanvirða heiður Krists at halda, at vit verða rættvísgjørd við slíkum; men tað stendur tó fast, at henda hugsan hevur økt siðirnar í kirkjuni næstan óavmarkað, og samstundis varð læran um trúnna og trúarrættvísina tálmað. Javnan vórðu fyriskipaðir fleiri heiligdagar, ásettar føstur, íbirtir halgisiðir og stovnsettir

nýggir klosturfelagsskapir, júst tí at upphavsmenninir til alt hetta hildu, at teir við hesum gerningum vunnu sær náðina. Fyrr komu á sama hátt fleiri lógir um bótina, sum vit enn síggja farvegin eftir í fulnaðargerningunum.

Teir, ið upphavsmenn eru til siðirnar, gera eisini ímóti Guds boðum, tá ið teir gera mat, dagar og tílíkt til ein spurning um synd, og teir plága kirkjuna við lógartrældómi, sum at kristnum menniskjum skal nýtast eina dýrkan fyri at vinna sær rættvísgeringina – lík teirri levitisku. Og hesa fyriskipan skal Gud hava givið ápostlum og biskupum. Soleiðis skriva summir, og tað tykist, sum pávarnir til eitt vist eru villleiddir av fyrimyndini úr Móselógini. Haðani stava hesar byrðar, eitt nú at tað skal vera synd til deyða at arbeiða við hondunum ein heiligdag, hóast eingin fær ástoyt av tí, at ávísur matur skal dálka samvitskuna, at sjálvpínsluføstur, ikki tær natúrligu, men sjálvgjørdu, skulu vera gerningar, ið blíðka Gud, at tað skal vera synd til deyða at vanrøkja kanónisku tíðirnar, at synd, har fyrivarni er tikið, ikki skal kunna verða fyrigivin uttan samtykki hansara, ið fyrivarnið hevur tikið, hóast kirkjulógirnar her ikki tala um fyrivarni viðvíkjandi skuldini, men viðvíkjandi kirkjuligu revsingini.

Hvaðani hava biskuparnir henda rætt at áleggja kirkjuliðunum slíkar siðir at tyngja samvitskurnar við, tá ið Pætur forbjóðar at leggja ok á lærusveinarnar, og tá ið Paulus sigur, at teimum er givið vald til uppbyggingar, ikki til niðurbrótingar? Hví fjølga teir syndirnar við slíkum siðum?

Men til skjals eru týðiligir vitnisburðir, ið forbjóða at íbirta siðir at blíðka Gud, ella sum vóru teir neyðugir til frelsu. Paulus: „Latið tí ongan døma tykkum fyri mat og drekka, ella vegna hátíðir, nýmánar og hvíludagar," Kol. 2,16. Somuleiðis: „Tá ið tit við Kristi eru deyð burtur frá heimsins maktum, hví lata tit tá slíkar fyriskipanir leggja á tykkum, eins og livdu tit framvegis í heiminum: tak ikki, smakka ikki og nem ikki við – lutir, sum allir eru ætlaðir at farast í brúki – alt samsvarandi mannaboðum og mannalærdómum?" Kol. 2, 20-22.

Við Titus: „Gev ikki gætur eftir jødiskum ævintýrum og boðum frá monnum, sum venda sær frá sannleikanum," Tit. 1,14.

Kristus sigur um tey, ið krevja siðaarv: „Leggið tit einki í teir! Blindir leiðvísarar eru teir fyri blindum", Matt. 15,14; og honum mislíkar slíka dýrkan: „Ein og hvør vøkstur, sum himmalski faðir mín ikki hevur sett niður, skal verða slitin upp við rót," Matt. 15,13.

Um biskuparnir hava rætt at plága samvitskurnar við slíkum siðum, hví forbjóðar Skriftin tá so ofta at íbirta siðir? Hví kallar hon teir djevulsins lærdómar? Man Heilagi Andin til einkis hava ávarað um hetta frammanundan?

Eftir stendur tí, við tað at tær fyriskipanir, sum eru settar í gildi sum neyðugar ella við tí í hyggju at vinna sær rættvísgering, eru ímóti evangeliinum, at tað ikki er loyvt biskupunum at íbirta slíkar siðir ella at krevja teir viðurkendar sum neyðugar. Men tað er neyðugt í kirkjuliðunum at halda fast við læruna um hitt kristna frælsið: at lógartrældómur ikki er neyðugur til rættvísgeringar, sum skrivað stendur í brævi Paulusar til galatarnar: „Latið tykkum ikki aftur noyða undir trældóms ok," Gal. 5,1. Tað er neyðugt at halda fast við aðaltáttin í evangeliinum: at vit fáa náðina við trúnni á Krist, ikki við at halda ávísar siðir ella við dýrkanum, ið menniskju hava fyriskipað.

Hvat skulu vit tá halda um sunnudagin og kirkjusiðir av sama slagi? Um tað siga teir, at tað er loyvt biskupum og prestum at seta í gildi fyriskipanir, fyri at alt skal fara sømiliga fram í kirkjuni, men ikki fyri at vit við teimum skulu gera fulnað fyri syndirnar. Heldur ikki skulu vit leggja á samvitskurnar at halda, at slíkar fyriskipanir eru ein neyðug gudsdýrkan. Soleiðis áleggur Paulus kvinnunum at hava um høvdið, og at týðararnir í kirkjuliðunum skulu verða hoyrdir í ávísum raði.

Tað sømir kirkjuliðunum at vera slíkum fyriskipanum lýðin fyri kærleika og frið skyld og at halda tær, kann tað verða gjørt, uttan at summi særa onnur, men at alt í kirkjuni fer fram sømiliga í friði og náðum; men tað eigur tó at fara fram soleiðis,

at samvitskurnar ikki verða darvaðar av teirri fatan, at hesar fyriskipanir eru neyðugar til frelsu, og at tær synda, um tær bróta tær uttan at vera nøkrum til meinboga; á sama hátt sum eingin hevði sagt, at ein kvinna syndar, um hon uttan at vera nøkrum til meinboga vísir seg alment við ongum um høvdið.

Soleiðis er tað vorðið við tí at halda sunnudag, páskir, hvítusunnu og tílíkar høgtíðisdagar og aðrar siðir. Tí hava tey ikki rætt, sum halda, at sunnudagshaldið er fyriskipað við kirkjunnar myndugleika sum neyðugt í staðin fyri sabbátshaldið. Tað er Skriftin, ið hevur sett sabbátin úr gildi, ikki kirkjan. Tí eftir at evangeliið er opinberað, kunnu allir halgisiðir í Móselógini verða avlagdir. Og av tí at tað kortini var neyðugt at áseta ein ávísan dag, fyri at fólk kundu vita, nær ið tey áttu at koma saman, er tað vituligt, at kirkjan til tess hevur ásett sunnudagin; hann tykist eisini vera valdur, so at fólk kunnu hava eitt dømi um kristna frælsið og kunnu vita, at tað hvørki var neyðugt at halda sabbát ella nakran annan dag.

Tað fara fram løgin orðaskifti um lógarbroyting, um halgisiðir í nýggju lógini og um at broyta sabbátin. Hetta stavar alt frá teirri skeivu hugsan, at í kirkjuni má vera ein dýrkan lík teirri í Gamla Testamenti, og at Kristus skal hava latið ápostlum og biskupum upp í hendur at íbirta nýggjar halgisiðir, sum eitast at vera neyðugir til frelsu. Hesar villur hava sníkt seg inn í kirkjuna, av tí at læran um trúarrættvísina hevur verið ógreið. Summi siga, at kanska verður sunnudagurin ikki hildin við guddómligum rætti, men tó sum við guddómligum rætti. Tey geva forskriftir um halgidagar, og um tað er loyvt at arbeiða hesar dagar. Men hvat eru slík orðaskifti annað enn fellur fyri samvitskurnar? Tí so leingi hildið verður, at halgisiðirnir eru neyðugir, fæst ongantíð greiða á, hvat ið rímiligt er, hóast tey royna at linka hesar siðir. Og henda hugsan fer at ráða, har trúarrættvísin og kristna frælsið verða vanskettað.

Ápostlarnir góvu boð um, at fólk skuldu halda seg frá blóði o.s.fr., verður sagt. Hvør ger tað? Og tó synda tey ikki, ið ikki gera tað. Tí at heldur ikki ápostlarnir sjálvir vildu við einum

slíkum trældómi leggja byrðar á samvitskurnar, men fyri ikki at valda ástoyt forbjóðaðu teir tað eina tíð. Tað er tí varandi viljin í evangeliinum, sum hugsað verður um við hesum boði.

Neyvan nakrar kirkjulógir verða nágreiniliga hildnar, og nógvar fara dagliga úr brúki enntá hjá teimum, ið annars verja siðaarvin. Tað verður heldur ikki sæð til samvitskurnar, gera vit okkum ikki greitt, at menniskjuligi siðaarvurin er ikki neyðugur, og samvitskurnar særast ikki, um siðir og skikkir broytast.

Men biskuparnir kundu lættliga hildið uppi lógásetta lýdninum, um teir ikki noyddu fólk at halda tann siðaarv, sum ikki kann verða hildin við góðari samvitsku. Nú krevja teir ógiftu, seta ongar aðrar prestar enn teir, ið svørja ikki at vilja læra ta reinu læruna samsvarandi evangeliinum. Kirkjur okkara krevja ikki, at biskuparnir aftur skulu fáa semju í lag, um tað kostar teimum tign teirra; tó sømdi tað góðum hirðum at gjørt tað. Tær krevja bert, at teir taka burtur tær órættvísu byrðar, sum eru nýggjar, og sum eru lagdar á fólk ímóti siðvenjuni í katólsku kirkjuni. Hesar fyriskipanir høvdu kanska í fyrstuni góðar grundir; men tær hóska ikki til seinni tíðir. Eisini er tað eyðsýnt, at summar eru ásettar av misgáum. Tað hevði tí verið í samsvari við mildleika biskupanna at linka tær nú, og ein slík broyting ger ikki einleika kirkjunnar veikari. Nógv av menniskjuliga siðaarvinum er broytt við tíðini, sum kirkjulógirnar sjálvar vísa. Men kann tann beini ikki verða veittur okkum, at tað verður slept, ið vit ikki kunnu halda, uttan vit synda, tá mega vit fylgja reglu ápostlanna, sum býður at vera Gudi meira lýðin enn menniskjum.

Pætur forbjóðar biskupunum at ráða og at noyða kirkjuliðini. Men her er ikki talan um, at biskuparnir skulu lata yvirvald sítt frá sær; vit biðja bara um, at teir lata sær lynda, at evangeliið verður lært rætt, og at teir taka av tær fáu fyriskipanir, ið ikki kunnu verða hildnar uttan at syndað verður. Men gera teir ikki tað, tá mega teir sjálvir síggja til, hvussu

teir skulu standa Gudi til svars fyri, at teir við hesum tvørlyndi gerast atvold til spjaðing.

Eftirmæli

Vit hava nú viðgjørt tær týdningarmestu greinirnar, ið ósemja er um. Tí hóast fleiri misbrúk kundu verið umrødd, so hava vit, fyri ikki at gera ov langt av, einans tikið fram tey týdningarmestu. Álvarsamar klagur hava verið um avlátið, pílagrímsferðirnar og at misbrúka bannsetingina. Á mangan hátt vórðu sóknirnar plágaðar av avlátssølumonnum; og endaleys hava stríðini verið millum prestar og munkar um sóknarrættin, um skriftamálið, um jarðarferðir og mangt annað. Mál av slíkum slagi hava vit lopið um og í fáum orðum sett fram tað, ið hevur størstan týdning í hesi søk, fyri at tað skal verða lættari at skilja. Her er einki sagt ella savnað saman fyri at háða nakran. Bara tað er lisið upp, ið tyktist vera neyðugt at siga, fyri at tað kundi vera (øllum) greitt, at hjá okkum er einki tikið við í læru ella halgisiðum, sum er ímóti Skriftini ella katólsku kirkjuni. Tað er tí eyðsýnt, at vit hava ansað væl eftir, at ikki nýggir og ógudiligir trúarsetningar skuldu sníkja seg inn í kirkju okkara.

Hesar áðurnevndu greinir hava vit viljað lagt fram eftir boði tygara keisaraligu hátignar. Í teimum stendur trúarjáttan okkara og høvuðstátturin í teirri læru, sum prædikumenn okkara boða. Skuldi okkurt vantað í hesi trúarjáttan, tá eru vit til reiðar, um Gud vil, at geva fleiri upplýsingar samsvarandi Skriftini.

Trúgvu tegnar tygara keisaraligu hátignar:
Johann, hertogi av Sakslandi, kurfúrsti.
Georg, markgreivi av Brandenburg.
Ernst, hertogi av Lünenburg, við egnari hond.
Philipp, landgreivi av Hessen.
Johann Frederik, hertogi av Sakslandi.
Franz, hertogi av Lünenburg.
Wolfgang, fúrsti av Anhalt.

Ráðið og býarstýrið í Nürnberg.
Ráðið í Reutlingen.

DR. MARTIN LUTHERS LÍTLA KATEKISMUS

Fortala

Martin Luther heilsar øllum trúgvum og gudrøknum prestum og prædikumonnum. Náði veri við tykkum, miskunn og friður í Jesusi Kristi, Harra várum.

Fyri stuttum var eg og vitjaði kirkjuliðini kring landið, og sá eg tá, hvussu út av lagi illa stóð til. Hetta hevur noytt meg at skriva hesa stuttu og einføldu katekismus ella kristnilæru. Hjálp, góði Gud – hvat havi eg ikki sæð av armóð. Fólk yvirhøvur vita als einki um kristnu læruna, serliga í landsbygdunum, og nógvir prestar nytta púra einki og duga als ikki at undirvísa. Men øll verða kallað kristin, verða doypt og njóta sakramentini, hóast tey hvørki duga Faðirvár, trúnna ella tey tíggju boðini. Tey liva sum fávitskut neyt og skilaleys svín, og har, ið evangeliið er komið, hava tey væl og virðiliga lært at misbrúka alt kristið frælsi. O, tit biskupar, hvat fara tit at svara Kristi, tit, sum so skammiliga hava slept fólkinum upp á fjall og onga løtu hava røkt embæti tykkara? Gævi ikki øll vanlukka rámar tykkum! Tit forbjóða fólki annan lutin í altarsins sakramenti, gera tykkum stóran ómak við lógum, menniskju hava gjørt, men halda tað ikki vera neyðugt at spyrja, um tey duga Faðirvár, trúnna, tey tíggju boðini ella nakað Guds orð yvirhøvur. Vei hálsum tykkara um ævir.

Tí biði eg tykkum allar, góðu menn og brøður, sum eru prestar og prædikumenn. Fyri Guds sakir røkið embæti tykkara til lítar, miskunnið tí fólki, sum tykkum er litið til, og hjálpið okkum at geva fólkinum kristna upplæring, serliga teimum ungu. Og teir, ið ikki eru førir fyri sjálvir at gera tað betur, skulu taka hesar **talvur** og hesi snið og siga fólkinum tey orð fyri orð á henda hátt:

Í fyrsta lagi má presturin ikki brúka ymiskar tekstir og snið av teimum tíggju boðunum, Faðirvár, trúnni, sakramentunum o.s.fr., eitt nú og annað tá. Hann skal nýta eitt ávíst snið, halda

seg til tað og brúka tað ár undan ári. Tað unga og góðtrúna fólkið má verða undirvíst við ávísum tekstum og sniðum, tí tað ørkymlar tey, verða tey ein dag lærd so og ein annan so, sum var tað ætlanin at gera tað betur, og tá verður alt stríðið til einkis. Hetta hava eisini kirkjufedrarnir skilt, og tí hava teir brúkt Faðirvár, trúnna og tey tíggju boðini í einum ávísum sniði. Tí skulu eisini vit læra tað unga og góðtrúna fólkið hetta uttan at broyta eitt stavilsi, og ikki í ár undirvísa ella læra øðrvísi enn í fjør. Vel tær tað snið, ið tú vilt brúka, og halt so fast við tað um ævir. Men prædikar tú fyri lærdum og vitugum, tá kanst tú vísa tín lærdóm, hvussu fjølbroyttir hesir spurningar kunnu vera, og venda og snara teimum so listuliga, sum tú dugir. Men til tað unga fólkið skalt tú brúka eitt ávíst og ævigt snið, og fram um alt skalt tú læra tey tey tíggju boðini, trúnna, Faðirvár o.s.fr. eftir tekstinum orð fyri orð, so tey læra tað og duga tað uttanat.

Men við tey, ið ikki vilja læra seg hetta, skal verða sagt, at tey avnokta Krist og eru ikki kristin. Tey skulu heldur ikki hava atgongd til sakramentini, ikki bera børn til dópin og ongan lut eiga í kristna frælsinum, men verða víst til pávan og hansara **officialar**, ja, til djevulin sjálvan. Tínæst skulu foreldur og húsbøndur sýta teimum mat og drekka og siga teimum, at fúrstin fer at reka slík ósiðað fólk av landinum o.s.fr.

Eingin kann ella skal verða noyddur at trúgva, men tað skal verða syrgt fyri, at fólk vita, hvat ið tey halda vera rætt og órætt, sum tey skulu búgva hjá og liva av. Tí skal nakar búgva í einum býi og njóta fyrimunir hansara, má hann kenna og lýða tær lógir, ið har galda, antin hann so trýr, ella innast inni er skálkur og bakbeist.

Í øðrum lagi: tá ið tey duga tekstin væl, skalt tú læra tey meiningina, so tey kunnu vita, hvat tað merkir. Tak tá aftur talvurnar ella eitt stutt snið, sum tú heldur vera best. Og halt so fast við tað á sama hátt sum við tekstin og broyt ikki eitt stavilsi í tí og gev tær góðar stundir. Tí tað er ikki neyðugt at taka fram allar partarnar undir einum, men hvønn eftir annan.

Tá ið tey skilja tað fyrsta boðið væl, kanst tú halda fram við tí næsta o. s.fr. Annars verða tey ovbyrjað og minnast als einki.

Í triðja lagi: tá ið tú nú hevur lært tey eina tílíka stutta katekismus, far tá undir Stóru Katekismus og gev teimum eina betri og fjølbroyttari fatan. Greið frá einum av boðunum ella einari bøn ella onkrum øðrum og sig frá teimum mongu gerningum, frá gagni og fruktum teirra, men eisini frá teimum vandum og meinum, sum hoyra uppí. Hetta er væl viðgjørt í mongum bókum um hesi evni. Tú skalt leggja serligan dent á tað boðið, ið viðger teir trupulleikar, sum eru í kirkjuliði tínum. Tá ið tú til dømis undirvísir handverkarum og handilsmonnum, men eisini bóndum og tænastufólki, skalt tú gera serliga nógv burtur úr 7. boði, tí vanliga eru mong óálítandi og tjóvsk fólk teirra millum. Somuleiðis skalt tú fyri børnum og vanligum fólki leggja serligan dent á 4. boð og leggja teimum eina við at vera sinnilig, trúføst, lýðin og friðarlig. Eisini skalt tú úr Skriftini taka fram mong dømi um, hvussu Gud hevur revsað og vælsignað slík menniskju. Serstakliga skalt tú minna yvirvald og foreldur á at stjórna og stýra við dugnaskapi og at senda børnini í skúla. Tú skalt vísa teimum, at tað er teirra skylda at gera hetta, og siga teimum, hvussu stórari synd tey gera seg sek í, gera tey tað ikki. Annars kollvelta og oyðileggja tey bæði Guds ríki og heimsins ríki og bera seg at sum Guds verstu fíggindar og menniskjans við. Tú skalt eisini gera teimum greitt, hvussu stóran skaða tey gera, hjálpa tey ikki til at fáa børnini til prest, prædikumann, skrivara o.s.fr., og at Gud fer at revsa tey hart fyri tað. Her er tað sera neyðugt at prædika. Hvat hesum viðvíkur synda foreldur og yvirvald nú á døgum, so ikki sigst frá. Og djevulin hevur eisini grimt í huga við hesum.

At enda: nú harðræði pávans er av, vilja tey ikki longur fara til altars, men vanvirða sakramentið. Her má okkurt gerast, men tað skal gerast á tann hátt, at vit ikki noyða nakran til trúnna ella sakramentið. Vit skulu heldur ikki áseta lógir fyri tíð og staði, men vit skulu prædika so, at tey uttan lógarboð

noyða seg sjálvi og noyða prestarnar at geva sær sakramentið. Og hetta gera vit á tann hátt, at vit siga við tey, at tann, ið ikki brúkar sakramentið ella biður um tað í minsta lagi fýra ferðir um árið, hann vanvirðir sakramentið. Og tað er fryktandi fyri, at hann er ikki kristin, sum tann ikki er kristin, ið ikki trýr ella lurtar eftir evangeliinum. Tí Kristus segði ikki: „Latið vera við hesum“ ella „vanvirðið hetta“, men: „Gerið hetta, so ofta sum tit tað drekka“ o.s.fr. Víst vil hann hava tað gjørt og ikki ógjørt og vanvirt. „**GERIÐ** hetta“, sigur hann.

Men tann, ið heldur lítið um sakramentið, man onga synd halda seg hava, einki hold, ongan djevul, ongan heim, ongan deyða, ongan vanda, einki helviti. Rættari sagt, hann heldur seg ongan lut eiga í hesum, og tó stendur hann upp undir hendur í øllum hesum og hoyrir djevlinum tvær ferðir til. Honum nýtist ikki náði, lív, paradís, himmiríki, Krist, Gud ella nakað gott yvirhøvur. Tí helt hann, at hann var fongdur við so nógv ilt, og at sær nýttist so nógv gott, tá hevði hann ikki hildið seg burtur frá sakramentinum. Tí júst har fæst hjálp fyri slíkum illum, og so nógv gott verður givið har. Tað hevði heldur ikki verið neyðugt við nakrari lóg at noyða hann til sakramentið, men hann hevði sjálvur komið rennandi, hann hevði noytt seg sjálvan og noytt teg at geva sær sakramentið.

Tí mást tú ikki sum pávin koma við fyriskipanum, men týðiliga gera vart við gagnið og skaðan, strevið og gávuna, vandan og frelsuna í sakramentinum, tí so koma tey av sær sjálvum og ikki noydd. Men koma tey ikki, tá lat tey fara og sig teimum, at tey, ið hvørki kenna sína stóru eymd ella virða Guds náðigu hjálp, hoyra djevlinum til. Men prentar tú ikki hetta inn í tey, ella gert tú eina lóg ella eitur burtur úr tí, tá er tað tín skyld, um tey vanvirða sakramentið. Hví skulu tey ikki vera dovin, svevur tú og tigur? Varið tykkum tí, tit prestar og prædikumenn. Embæti okkara er nú øðrvísi, enn tað var undir pávanum. Nú er tað trupult og gagnligt, tí nú hoyrir til embætið nógv stríð og strev, vandi og ivi og bara lítil løn og tøkk í heiminum. Men Kristus skal vera løn okkara, arbeiða vit

við trúfesti. Hartil hjálpi okkum Faðirin at allari náði, honum veri lov og tøkk um ævir við Kristi, Harra várum. Amen.

Talva = ein stuttur tekstur í bókaskapilsi.

Officialar vóru teir, sum biskupsins vegna útintu dómsmyndugleika hansara.

Fyrsti høvuðspartur

Hini tíggju boðini, *soleiðis sum ein húsbóndi einfalt eigur at leggja heimafólki sínum tey í huga.*

Fyrsta boð – *Tú mást ikki hava aðrar gudar.*
Tað er: Vit eiga fram um alt at óttast og elska Guð og seta alla okkara lít til hansara.

Annað boð – *Tú mást ikki misbrúka navn Harrans Guðs tíns.*
Tað er: Vit eiga at óttast og elska Guð, so at vit ikki við navni hansara banna, svørja, ganda, lúgva ella svíkja, men í hvørjari neyð okkara ákalla tað, tilbiðja, lova og takka.

Triðja boð – *Minst til at halda hvíludagin heilagan.*
Tað er: Vit eiga at óttast og elska Guð, so at vit ikki vanvirða prædikuna og orð hansara, men halda tað heilagt, fegin hoyra og læra tað.

Fjórða boð – *Æra faðir tín og móður tína.*
Tað er: Vit eiga at óttast og elska Guð, so at vit ikki vanvirða foreldur okkara og harrar okkara ella fáa ilt í tey, men halda tey í æru, tæna teimum, akta, elska og virða tey.

Fimta boð – *Tú mást ikki sláa í hel.*
Tað er: Vit eiga at óttast og elska Guð, so at vit ikki gera næsta okkara nakran skaða ella nakað mein á likamið, men hjálpa honum og dugna honum í hvørjari neyð og deyðaváða.

Sætta boð – *Tú mást ikki dríva hor.*
Tað er: Vit eiga at óttast og elska Guð, so at vit liva siðuliga og sámiliga í orði og verki, og at ein og hvør elskar og ærir ektafelaga sín.

Sjeynda boð – *Tú mást ikki stjala.*
Tað er: Vit eiga at óttast og elska Guð, so at vit ikki taka frá næsta okkara pengar ella ognarlutir hansara, og ikki heldur draga teir undir okkum við følskum vørum ella øðrum sviki, men hjálpa honum at fremja atvinnu sína og at hava tað, ið hann eigur.

Áttanda boð – *Tú mást ikki bera falskan vitnisburð ímóti næsta tínum.*
Tað er: Vit eiga at óttast og elska Guð, so at vit ikki lúgva upp á næsta okkara, ikki svíkja hann, baktala hann ella spilla hann út; men vit eiga at umbera hann, tala gott um hann og taka alt væl upp og leggja tað besta í alt.

Níggjunda boð – *Tú mást ikki girnast hús næsta tíns.*
Tað er: Vit eiga at óttast og elska Guð, so at vit ikki við list tráa eftir arvi ella húsi næsta okkara og við eiti av rætti draga tað undir okkum, men hjálpa honum og dugna honum, so at hann kann hava tað.

Tíggjunda boð – *Tú mást ikki girnast konu næsta tíns, ikki húskall ella arbeiðiskonu hansara, ikki fæ hansara ella nakað, sum næsti tín eigur.*
Tað er: Vit eiga at óttast og elska Guð, so at vit ikki lokka ella noyða konu, arbeiðisfólk ella fæ frá næsta okkara, men halda tey til at verða og at gera tað, ið tey eiga at gera.

Hvat sigur nú Guð um øll hesi boð?

Hann sigur soleiðis:
Eg, Harrin Guð tín, eri ein vandin Guð, sum heimsøkir misgerðir fedra á børn til triðja og fjórða lið, teirra ið meg hata; men teimum, ið meg elska og halda boð míni, teimum geri eg væl ímóti í túsunda lið.
Tað er: Guð hóttir við at revsa øll tey, sum bróta hesi boð. Tí

eiga vit at óttast vreiði hansara og ikki gera ímóti teimum. Men hann lovar øllum, sum halda hesi boð, náði og alt gott. Tí eiga vit eisini at elska hann og líta á hann og fegin gera eftir boðum hansara.

Annar høvuðspartur

Trúgvin, *soleiðis sum ein húsbóndi einfalt eigur at leggja heimafólki sínum hana í huga.*

Fyrsta grein – Um skapanina

Eg trúgvi á Guð Faðir, hin alvalda, skapara himins og jarðar.

Tað er: Eg trúgvi, at Guð hevur skapað meg eins og allar skapningar; at hann hevur givið mær likam og sál, eygu, oyru og allar limir, vit og allar sansar, og enn uppiheldur øllum hesum; at hann gevur klæði og skógvar, mat og drekka, hús og heim, konu og børn, mark, fæ og alt gott, at hann ríkliga og dagliga syrgir fyri øllum, ið mær tørvast fyri hetta likam og lív, varðar meg fyri øllum vanda, bjargar mær úr øllum illum og vakir yvir mær; alt hetta eina av faðirligari, guddómligari góðsku og miskunn, uttan at tað er mær nakað at takka, og at eg eri tess verdur. Fyri alt hetta eigi eg at takka og prísa honum og at tæna honum og verða honum lýðin. Sanniliga er tað satt.

Onnur grein – Um endurloysanina

Eg trúgvi á Jesus Krist, Guðs einborna son, váran harra, sum er gitin av Heilagum Anda, borin í heim av Mariu moy, pínslaður undir Pontiusi Pilatusi, krossfestur, deyður og jarðaður, niðurfarin til heljar, triðja dagin staðin upp frá deyðum, farin til himmals, sitandi við høgru hond Guðs faðirs hins alvalda, haðani hann kemur at døma livandi og deyð.

Tað er: Eg trúgvi, at Jesus Kristus, ið er sannur Guð, føddur av Faðirinum í upphavi, og eisini sannur maður, føddur av Mariu moy, er harri mín, sum hevur endurloyst meg farnu og

dømdu menniskju, bjargað og vunnið meg frá øllum syndum, frá deyðanum og frá djevulsins valdi, ikki við gulli ella silvri, men við sínum heilaga, dýrabæra blóði og við síni sakleysu pínslu og deyða, fyri at eg með alla skal vera hansara og í ríki hansara liva undir honum og tæna honum í ævigum rættlæti, sakloysi og sælu, líkasum hann er staðin upp frá deyðum, livir og ræður um allar ævir. Sanniliga er tað satt.

Triðja grein – Um halganina

Eg trúgvi á heilagan anda, eina heilaga almenna kirkju, samfelag teirra heilagu, fyrigeving syndanna, uppreisn likamsins og lív um aldur og ævir.

AMEN

Tað er: Eg trúgvi, at eg ikki av egnum viti ella mátti kann trúgva á Jesus Krist, harra mín, ella koma til hansara; men tað er hin heilagi andin, sum hevur kallað meg við evangeliinum, hevur lýst mær við gávum sínum, hevur halgað meg og hildið mær uppi í teirri rættu trúnni, líkasum hann kallar, savnar, upplýsir, halgar alt hitt kristna kirkjuliðið í heiminum og heldur tí uppi í Jesusi Kristi við teirri sonnu, einastu trúnni. Í hesum kristna kirkjuliði fyrigevur hann dagliga mær og øllum teimum trúgvandi alla synd ríkliga og vil á evsta degi vekja okkum øll upp úr deyða og geva mær og øllum, ið trúgva á Krist, eitt ævigt lív. Sanniliga er tað satt.

Triði høvuðspartur

Faðir vár, *soleiðis sum ein húsbóndi einfalt eigur at leggja heimafólki sínum tað í huga.*

Faðir vár, tú sum ert á himnum!
Tað er: Guð vil hervið fáa okkum at trúgva, at hann er rætti faðir okkara, og at vit eru rættu børn hansara, fyri at vit í troysti og fullum áliti skulu biðja til hansara, eins og børn hugað biðja foreldur síni um okkurt.

Fyrsta bøn – *Heilagt verði navn títt!*
Tað er: Guðs navn er heilagt í sjálvum sær; men vit biðja í hesi bøn, at tað eisini má verða heilagt hjá okkum.

Hvussu verður tað?
Tá ið Guðs orð verður lært reint og rætt, og vit eisini liva heilagt hareftir sum Guðs børn. Til tess hjálp okkum, kæri faðir á himni! Men tann, ið lærir og livir øðrvísi, enn Guðs orð lærir, hann vanhalgar Guðs navn okkara millum. Varða okkum frá tí, himmalski faðir!

Onnur bøn – *Komi ríki títt!*
Tað er: Guðs ríki kemur væl av sjálvum sær uttan bøn okkara; men vit biðja í hesi bøn, at tað eisini má koma til okkara.

Hvussu verður tað?
Tá ið himmalski faðirin gevur okkum heilaga anda sín, so at vit við náði hansara trúgva hansara heilagu orðum og liva í gudsótta ævi okkara her og í himni um allar ævir.

Triðja bøn – *Verði vilji tín sum í himli so á jørð!*
Tað er: Guðs góði, miskunnsami vilji verður væl uttan bøn

okkara; men vit biðja í hesi bøn, at hann eisini má verða hjá okkum.

Hvussu verður tað?
Tá ið Guð villir og forðar øllum illum ráðum og royndum, ið ikki vilja lata okkum halga navn hansara og ikki lata ríki hansara koma (slíkt er djevulsins, heimsins og holds okkara vilji), og tá ið hann har afturímóti styrkir og varðveitir okkum føst í orði sínum og í trúnni til okkara síðstu stund. Hetta er hansara miskunnsami og góði vilji.

Fjórða bøn – *Gev okkum í dag okkara dagliga breyð!*
Tað er: Guð gevur væl dagligt breyð, eisini uttan bøn okkara, enntá øllum óndum menniskjum; men vit biðja í hesi bøn, at vit mega meta tað og taka ímóti okkara dagliga breyði við tøkk.

Hvat meinast so við dagligt breyð?
Alt tað, ið okkum tørvast til lívsins uppihald, til dømis matur, drekka, klæði, skógvar, hús, heim, mark, fæ, peningur, góðs, góður ektafelagi, góð børn, góð arbeiðisfólk, góð trúføst yvirvøld, gott stýrislag í landinum, gott veðurlag, friður, heilsa, góðir siðir, æra, góðir vinir, trúgvir grannar og tesslíka.

Fimta bøn – *Og fyrigev okkum syndir okkara, so sum vit eisini fyrigeva teimum, ið móti okkum synda!*
Tað er: Vit biðja í hesi bøn, at himmalski faðirin ikki vil líta at syndum okkara og fyri teirra skuld sýta bøn okkara. Tí vit eru einkis verð av tí, sum vit biðja um, og eiga tað heldur ikki uppiborið; men vit biðja, at hann vil geva okkum alt samalt av náði, tí at vit synda dagliga nógv og eiga einki annað at fáa uttan revsing. So vilja vit eisini av hjarta fyrigeva og fegin gera væl ímóti teimum, ið gera illa ímóti okkum.

Sætta bøn – *Og leið okkum ikki í freistingar!*
Tað er: Guð freistar væl ongan, men vit biðja í hesi bøn, at hann

vil varða og verja okkum, fyri at djevulin, heimurin og hold okkara ikki skulu svíkja okkum ella villa okkum til vantrúgv, vónloysi og aðra vanvirðiliga synd og last, men um vit soleiðis verða freistað, at vit kortini til síðst mega vinna og fáa sigur.

Sjeynda bøn – *Men frels okkum frá tí illa!*
Tað er: Vit biðja í hesi bøn sum undir einum, at himmalski faðirin vil frelsa okkum frá alskyns illum til likams og sálar, ognar og æru, og til síðst, tá ið okkara tíð kemur, veita okkum eina sæla burturferð og av náði taka okkum frá hesum neyðardali til sín á himni.

AMEN!
Tað er: At eg skal vera vísur í, at hesar bønir eru himmalska faðirinum væl toknaðar og av honum bønhoyrdar; tí hann hevur sjálvur boðið okkum at biðja soleiðis og lovað, at hann vil bønhoyra okkum. Amen, amen! tað merkir: Ja, ja, tað skal soleiðis verða.

Fjórði høvuðspartur

Hins heilaga dóps sakramenti, *soleiðis sum ein húsbóndi einfalt eigur at leggja heimafólki sínum tað í huga.*

Í fyrsta lagi. – **Hvat er dópurin?**
Dópurin er ikki vatn einsamalt, men vatnið, skilað til í Guðs boði og sameint við Guðs orði.

Hvat er so hetta fyri Guðs orð?
Um hetta sigur vár harri Kristus hjá Matteusi í seinasta kapitli: Farið og gerið øll fólkasløgini til lærusveinar mínar, við tað at tit doypa tey til navns faðirsins og sonarins og hins heilaga anda.

Í øðrum lagi. – **Hvat gevur ella gagnar dópurin?**
Hann virkar fyrigeving syndanna, loysir frá deyðanum og djevulinum og gevur øllum teimum, ið hesum trúgva, hina ævigu sælu, soleiðis sum Guðs orð og fyrijáttan ljóða.

Hvat er so hetta fyri Guðs orð og fyrijáttan hansara?
Um hetta sigur vár harri Kristus hjá Markusi í seinasta kapitli: Tann, ið trýr og verður doyptur, skal verða frelstur; men tann, ið ikki trýr, skal verða dømdur.

Í triðja lagi. – **Hvussu kann vatn avrika slík stór verk?**
Vatn avrikar tey vissuliga ikki, men Guðs orð, sum er í og við vatninum, og trúgvin, ið lítur á Guðs orðið, ið er sameint við vatninum. Tí uttan Guðs orð er vatnið bert vatn og eingin dópur; men við Guðs orði er tað ein dópur, tað er: eitt náðiríkt lívsins vatn og eitt endurføðingarinnar bað í hinum heilaga anda, soleiðis sum Paulus ápostul sigur til Titusar í triðja

kapitli: Hann frelsti okkum við endurføðingarinnar baði og við endurnýggjanini í hinum heilaga anda, sum hann ríkliga úthelti yvir okkum fyri Jesus Krist, frelsara okkara, fyri at vit, rættvísgjørd av náði hansara, skuldu í vónini verða arvingar til ævigt lív.

Hetta er sonn tala.

Í fjórða lagi. – **Hvat er so vatnið í dópinum eitt tekin um?**
Tað merkir, at hin gamli Ádam í okkum eigur at fara undir við dagligari iðrun og bót og at verða dripin við øllum syndum og óndum lystum, og at harafturímóti hin nýggja menniskjan dagliga eigur at koma undan og at reisast upp at liva um ævir fyri Guði í rættvísi og reinleika.

Hvar stendur tað skrivað?
Paulus ápostul sigur til Rómverja í sætta kapitli: Vit eru grivnir við Kristi í dópinum til deyðans, fyri at eins og Kristus varð vaktur upp frá deyðum við dýrd faðirsins, soleiðis skulu vit eisini liva eitt nýtt lív.

Hvussu vanlig fólk eiga at verða lærd at skrifta

Hvat er skriftamálið?
Skriftamálið er í tveimum pørtum. Í fyrra lagi játta vit syndirnar; í øðrum lagi taka vit ímóti avloysingini ella fyrigevingini frá skriftafaðirinum sum frá Gudi sjálvum og ivast ikki í henni, men trúgva fult og fast, at syndir okkara tí eru fyrigivnar fyri Gudi í himmalinum.

Hvørjar syndir eiga vit tá at skrifta?
Fyri Gudi eiga vit at viðganga, at vit eru sek í øllum syndum, teimum við, ið vit ikki vita um, soleiðis sum vit gera í Faðirvár.

Men fyri skriftafaðirinum skulu vit bara játta tær syndir, sum vit vita um, og sum plága samvitsku okkara.

Hvørjar eru tær?
Hugsa um stand tín og ber hann saman við tey tíggju boðini, um tú ert faðir, móðir, sonur, dóttir, húsbóndi, húsmóðir ella tænari; – um tú hevur verið ólýðin, ótrúgvur, latur, vreiður, frekur, klandursamur, um tú hevur gjørt ilt við orði ella gerningi, um tú hevur stolið, verið órøkin ella gáloysin ella hevur gjørt fortreð.

Sig mær í stuttum, hvussu eg skal skrifta!

Soleiðis skalt tú siga við skriftafaðirin:
„Eg biði teg um, at tú vilt hoyra skriftamál mítt og Guds vegna boða mær syndanna fyrigeving."

„Sig fram!"
„Eg, neyðars syndari, játti meg sekan fyri Gudi í øllum syndum. Serliga játti eg fyri tær, at eg eri húskallur ella arbeiðskona o.s.fr., men tíverri tæni eg ikki húsbóndafólki mínum við trúskapi, tí her og har havi eg ikki gjørt tað, ið tey áløgdu mær at gera. Eg havi fingið ilt í tey, so at tey bannaðu, og eg havi verið órøkin, so skaði stóðst av. Eisini havi eg verið ósømilig í orðum og gerningum, havi íbirt klandur við arbeiðsfelagar mínar og havi knarrað og bannað aftur ímóti húsmóður míni o.s.fr. Alt hetta ger mær ilt, og eg biði um Guds fyrigeving; eg skal betra meg."

Ein húsbóndi ella húsmóðir kann siga soleiðis:
„Serliga játti eg fyri tær, at eg havi ikki trúliga alt upp børn míni, húsfólk og konu mína til Guds æru. Eg havi bannað, við ósømiligum orðum og gerningum verið eitt ringt fyridømi, gjørt granna mínum skaða og talað ilt um hann; eg havi selt ov dýrt, latið falskar vørur, sum vóru ov lættar" – og hvat annað hann hevur gjørt ímóti Guds boðum og lívsstarvi sínum, o.s.fr.

Men tann, ið ikki kennir seg tyngdan av slíkum ella av stórum syndum, skal tó ikki vera stúrin ella leita eftir øðrum syndum. Hann skal heldur ikki finna upp á syndir og á tann hátt gera skriftamálið til ein pínubonk. Tú skalt siga frá einari synd ella tveimum, sum tú veitst um. Altso: „Serliga játti eg, at eg eina ferð havi bannað, somuleiðis havi eg eina ferð verið óhøviskur í orðum, eina ferð havi eg gloymt at....o.s.fr.“ Og so er tað nóg mikið.

Men veitst tú als ikki av nakrari synd (tað er neyvan møguligt), so nevn einki serstakt, men tak við fyrigevingini í vanliga skriftamálinum, sum tú fyri skriftafaðirinum leggur fram fyri Gud.

So skal skriftafaðirin siga: „Gud veri tær miskunnsamur og styrki trúgv tína. Amen.“

Sig so: „Trýrt tú, at mín fyrigeving er Guds fyrigeving?“

„Ja.“

Síðani skal hann siga. „Verði tær, sum tú trúði. Og eftir boðum várs Harra Jesu Krists fyrigevi eg tær syndir tínar í navni Faðirsins og Sonarins og Heilaga Andans. Amen! Far í friði!“ Men tann, ið samvitskan plágar, ella er nívdur av sorg og iva, skal skriftafaðirin ivaleyst duga at troysta við fleiri bíbliuorðum og eggja honum til trúgv. Á henda hátt kunnu vanlig fólk skrifta.

Fimti høvuðspartur

Altarsins sakramenti, *soleiðis sum ein húsbóndi einfalt eigur at leggja heimafólki sínum tað í huga.*

Hvat er altarsins sakramenti?
Tað er várs harra Jesu Krists sanna likam og blóð, undir breyði og víni, fyriskipað av Kristi sjálvum fyri okkum kristnu at eta og drekka.

Hvar stendur tað skrivað?
Soleiðis skriva hinir heilagu evangelistarnir Matteus, Markus, Lukas og Paulus ápostul:

Vár harri Jesus Kristus á teirri nátt, sum hann svikin varð, tók hann breyðið, takkaði og breyt tað, gav lærusveinum sínum tað og segði: Takið hetta og et etið tað; hetta er likam mítt, sum fyri tykkum verður givið. Gerið hetta til mínar áminningar! Somuleiðis tók hann eisini kalikin aftan á kvøldmáltíðina, takkaði, gav teimum og segði: Drekkið allir her av; hesin kalikur er hin nýggi sáttmálin í blóði mínum, sum fyri tykkum verður úthelt til fyrigevingar syndanna. Gerið hetta, so ofta sum tit tað drekka, til mínar áminningar!

Hvat gagnar tað soleiðis at eta og drekka?
Tað gera hesi orð kunnigt: Tað verður givið og úthelt fyri tykkum til fyrigevingar syndanna.

Við hesum orðum verða okkum nevnliga givin í sakramentinum fyrigeving syndanna, lív og sæla. Tí har sum fyrigeving syndanna er, har er eisini lív og sæla.

Hvussu kann likamlig etan og drekkan avrika so stór verk?
At eta og drekka avrikar tað vissuliga ikki, men tað ið avrikar tað, eru hesi orð: Tað verður givið og úthelt fyri tykkum til fyrigevingar syndanna. Tí at hesi orð eru saman við teirra likamligu etan og drekkan aðalmálið í sakramentinum, og tann, ið trýr hesum orðum, hann hevur tað, ið tey siga, og sum tey ljóða, nevnliga fyrigeving syndanna.

Hvør tekur so við hesum sakramenti virðiliga?
At fasta og at búgva likam sítt til er væl ein góður útvortis siður; men tann er av sonnum verðigur og væl skikkaður, ið hevur trúnna á hesi orð: tað verður givið og úthelt fyri tykkum til fyrigevingar syndanna. Men tann, ið ikki trýr hesum orðum ella ivast, hann er óverðigur og óskikkaður; tí at hetta orðið „fyri tykkum“ krevur fram um alt trúgvandi hjørtu.

Hvussu ein húsbóndi eigur at læra heimafólk sítt at biðja morgun- og aftanbøn.

Morgunbøn
Um morgunin, tá ið tú fert upp, skalt tú signa teg og siga:

Í navni faðirsins og sonarins og hins heilaga anda! Amen.

Sig so á knøum ella standandi trúarorðini og faðir vár. Um tú vilt, kanst tú eisini biðja hesa lítlu bøn: Eg takki tær, himmalski faðir mín, við Jesusi Kristi, elskuliga syni tínum, fyri at tú hesa nátt hevur varðveitt meg frá øllum skaða og váða; og eg biði teg, at tú eisini í dag vil varða meg frá synd og øllum illum, so at alt yrki mítt og øll atferð mín má líka tær væl. Tí eg gevi meg við likami og sál og øllum lutum í hendur tínar. Tín heilagi eingil veri við mær, fyri at Illimaður ikki skal fáa nakað vald á mær! Amen.

Far so við gleði til arbeiðis. Tú kanst eisini syngja ein sálm, sum t. d. „Óttast barn mítt sannan Guð," ella okkurt annað, ið kann verða til ugga.

Aftanbøn
Um kvøldið, tá ið tú fert at leggjast, skalt tú signa teg og siga:

Í navni faðirsins og sonarins og hins heilaga anda! Amen.

Sig so á knøum ella standandi trúarorðini og faðir vár. Um tú vilt, kanst tú eisini biðja hesa lítlu bøn: Eg takki tær, himmalski faðir mín, við Jesusi Kristi, elskuliga syni tínum, fyri at tú henda dag náðiliga hevur varðveitt meg; og eg biði teg, at tú vilt fyrigeva mær allar syndir mínar, sum eg havi gjørt tær ímóti við og náðiliga varða meg í nátt. Tí eg gevi meg við likami og sál og øllum lutum í hendur tínar. Tín heilagi eingil veri við mær, fyri at Illimaður ikki skal fáa nakað vald á mær! Amen.

Og so alt fyri eitt glaður at sova!

Hvussu ein húsbóndi eigur at læra heimafólk sítt at biðja undan og aftaná máltíðina.

Børnini og arbeiðsfólkini skulu halda hendurnar saman og sámiliga koma at borðinum og siga: Øll venda eygum sínum vónandi til tín, Harri, og tú gevur teimum føði teirra í rættum tíma; tú letur upp tína hond og mettar alt, sum livir, við signing.

Lýsing
Signing merkir her Guðs stóru gávumildi, sum veitir øllum livandi skapningum so nógva føði, at teir eru fegnir og væl heitnir; stúran og ágirnd forða slíkari signing.

Tínæst faðir vár og hesa bøn: Harra Guð, himmalski faðir, vælsigna okkum og hesar gávur tínar, sum vit fáa av tíni mildu miskunn, við Jesusi Kristi, várum harra! Amen.

Líkaleiðis aftan á máltíðina skulu tey sámiliga og meðan tey halda saman hendur siga:

Harranum takkið, tí at hann er góður og miskunn hansara varir um ævir! Hann gevur øllum skapningum at eta, hann gevur djórunum føðslu teirra og ravnsungunum, tá ið teir rópa. Hann hevur ei yndi til styrkleika hestsins, hann hevur ei tokka á mansins snaru beinum. Tokka hevur Harrin á teimum, ið hann óttast og eftir miskunn hansara bíða.

Og tínæst faðir vár og hesa bøn: Vit takka tær, Harra Guð faðir, við Jesusi Kristi, várum harra, fyri allar vælgerðir tínar, tú, sum livir og ræður um allar ævir! Amen.

Hústalvan, *sum nøkur orð úr teirri heilagu skrift standa á, ið skulu minna ein og hvønn í sínum lagi og í sínari støðu um skyldur sínar.*

Biskupar og prestar

Ein umsjónarmaður eigur at vera óatfinnandi, einar konu maður, fráhaldandi, hóvsamur, høviskur, gestablíður, dúgligur at læra onnur; ikki tráur eftir víni, ikki eftir bardøgum, men mildur, ikki klandursamur, ikki peningagrammur; maður, sum stendur væl fyri sínum egna húsi, sum heldur børnum sínum í lýdni við øllum sóma; ikki nýggjur í trúnni; maður, ið heldur fast við hitt álítandi orðið samsvarandi læruni, fyri at hann kann vera dúgligur til bæði at áminna við hini heilnæmu læruni og at reka aftur teir, ið mæla ímót. 1. Tim. 3. Tit. 1.

Hin verðsliga yvirvøldin

Hvør maður veri fyriskipaðum yvirvøldum lýðin; tí at ikki er nøkur yvirvøld til uttan frá Guði, men tær, sum til eru, eru skipaðar av Guði, so at tann, sum veitir yvirvøldini mótstøðu, hann veitir Guðs fyriskipan mótstøðu; men teir, sum veita mótstøðu, skulu fáa dóm sín. Yvirvøldin er tænari Guðs, tær til góða. Men gert tú tað, sum ilt er, tá skalt tú øtast; tí at hon ber ikki svørðið til einkis, av tí at hon er tænari Guðs, hevnari til revsingar fyri tann, sum hevst at tí, sum ilt er. Róm. 13.

Tegnar

Gevið keisaranum tað, ið keisarans er. Matt. 22. Hvør maður veri fyriskipaðum yvirvøldum lýðin o. s. fr. Tað er fyri neyðini at vera lýðin, ikki bert fyri revsingarinnar skuld, men eisini fyri samvitskunnar skuld. Tí gjalda tit jú eisini skattir; tí at teir eru tænarar Guðs, sum serliga hava hetta í varðveitslu. Gjaldið øllum tað, sum tit skylda teimum; tí skatt, sum skal hava skatt; tí toll, sum skal hava toll; tí ótta, sum skal hava ótta; tí virðing, sum skal hava virðing. Róm. 13. Fyrst av øllum áminni eg tá um, at tað verða hildnar bønir, ákallanir, fyribønir, takkargerðir fyri øllum menniskjum, fyri kongum og øllum teimum, sum eru settir hátt, fyri at vit mega liva eitt stilt og friðarligt lív í øllum gudsótta og sóma. 1. Tim. 2. Minn teir á at vera stýrisvøldum og yvirráðum undirgivnir. Tit. 3. Verið fyri Harrans sakir eini og hvørjari menniskjuligari fyriskipan undirgivnir, hvørt tað so er einum kongi sum hinum hægsta ella landshøvdingum sum teimum, ið av honum eru sendir. 1. Pet. 2.

Ektamenn

Tit menn! Livið við skynsemi saman við konum tykkara sum við einum veikari keri, og veitið teimum virðing eins og tær eisini eru samarvingar við tykkum til náðigávu lívsins, fyri at bønir tykkara ikki mega hindrast. 1. Pet. 3. Og verið ikki beiskir við tær. Kol. 3.

Ektakonur
Tit konur! Verið tykkara egnu monnum undirgivnar, fyri at, um so er, at summir ikki vilja lýða orðinum, teir so mega vinnast orðaleyst við atferðini hjá konunum. 1. Pet. 3.

Foreldur
Tit fedrar! Illskið ikki børn tykkara upp, men alið tey upp við aga og áminning Harrans. Ef. 6.

Børn
Tit børn! Lýðið foreldrum tykkara í Harranum; tí at tað er rætt. „Æra faðir tín og móðir tína," hetta er hitt fyrsta boðið við fyrijáttan, „fyri at tær má gangast væl, og tú mást liva leingi í landinum." Ef. 6.

Húskallar, arbeiðiskonur, bønamenn, arbeiðismenn
Tit tænara! Lýðið húsbóndum tykkara við ótta og bivan í hjartans einfaldi tykkara, sum var tað Kristus; ikki við eygnatænastu eins og teir, ið vilja toknast monnum, men eins og tænarar Krists, so at tit gera vilja Guðs av hjarta, við tað at tit av góðum vilja gera tænastu, sum var tað fyri Harranum og ikki fyri monnum, av tí at tit vita, at hvat gott, sum ein og hvør ger, tað skal hann fáa aftur av Harranum, hvørt hann so er trælur ella frælsur. Ef. 6.

Húsbóndi og matmóðir
Tit harrar! Gerið tit tað sama móti teimum, so at tit lata av hóttum, við tað at tit vita, at bæði harri teirra og tykkara er í himlunum, og at tað hjá honum ikki verður gjørdur mannamunur. Ef. 6.

Tey ungu
Tit ungu! Verið teimum eldru undirbrotlig; og klæðist øll í lítillæti hvør móti øðrum, tí at Guð stendur dramblátum ímót, men eyðmjúkum veitir hann náði. Eyðmýkið tykkum tí undir

Guðs veldigu hond, fyri at hann á sínum tíma má upphevja tykkum. 1. Pet. 5.

Einkjur
Tann, sum í roynd og veru er einkja og stendur einsamøll, hevur sett vón sína til Guðs og heldur á við ákallan og bønum nátt og dag; men tann, sum livir, sum henni lystir, er livandi deyð. 1. Tim. 5.

Kirkjuliðið
„Tú skalt elska næsta tín sum sjálvan teg," hetta er aðalinnihaldið í boðunum. Róm. 13. Haldið á við bønum fyri øllum menniskjum. 1. Tim. 2.

Um hvør ein orð Guðs læra vil, tá væl í húsi stendur til.